

Heildarverkætlan:

# Harðskapur í parlagi og nærsambondum

2023-2028



**Heildarverkætlan: Harðskapur í parlagi og nærsambondum**
Útgevari: Almanna- og mentamálaráðið
Útgivið: 28. august 2023
Talgild útgáva (PDF fíla) kann takast niður av heimasíðuni hjá ammr.fo
Uppseting: Anna & annað – Anna Simonsen
Prent: Føroyaprent

# Innihald


Formæli . . . . . . . . . . 5

Arbeiðið við heildarætlanini . . . . . . . . . . 6

Eitt lív í harðskapi . . . . . . . . . . 7
Lóggáva um harðskap . . . . . . . . . . 7
Revsilógin . . . . . . . . . . 7
Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur . . . . . . . . . . 7
Lívið við harðskapi . . . . . . . . . . 7
Hjálpin til harðskapsrakt . . . . . . . . . . 10
Hagtøl úr Kvinnuhúsinum . . . . . . . . . . 10
Gistingar á Kreppumiðstøðini . . . . . . . . . . 12
Tilmælini í Heildarverkætlanini um harðskap í parlagi og nærsambondum 2023-2028 . . . . . . . . . . 17

Yvirskipað um átaksøkini . . . . . . . . . . 18
Samanfallandi avbjóðingar . . . . . . . . . . 18
Uppbýtið av átøkum í økir . . . . . . . . . . 19
At upplýsa og fyribyrgja harðskapi . . . . . . . . . . 19
Átøk sum stuðul til harðskapsrakt . . . . . . . . . . 23
Átøk, ið venda sær til yrkisbólkar . . . . . . . . . . 28
Átøk at lætta um atgongdina til hjálp í sambandi við harðskapin . . . . . . . . . . 32
Átøk at stuðla vísindaligum kanningararbeiði innan harðskapsøkið . . . . . . . . . . 33

Eftirmæli . . . . . . . . . . 36

Fylgiskjal 1 . . . . . . . . . . 37
Fylgiskjal 2 . . . . . . . . . . 38
Fylgiskjal 3 . . . . . . . . . . 40

# Formæli

Harðskapur er altíð eitt samfelagsmál og ongantíð eitt privatmál. Harðskapur er ólógligur og skal ongantíð góðtakast ella rættvísgerast. Eingin ynskir at liva í harðskapi. Kortini finst harðskapur – eisini í parløgum og nærsambondum. Tað at viðurkenna harðskapin er alt annað enn lætt, hvørki fyri tann harðskapsrakta, fyri fremjaran ella fyri avvarðandi. Hóast møguleikar eru fyri at søkja sær hjálp og stuðul, vísir hetta seg framvegis at vera ein stór avbjóðing.

Henda heildarætlanin um harðskap í parløgum og nærsambondum er onnur av sínum slagi í Føroyum. Við fyrru heildarætlanini frá 2011 tóku vit fyri fyrstu ferð politisk stig til at arbeiða miðvíst fyri at upplýsa um og fyribyrgja harðskapi, at stuðla harðskapsraktum og veita viðgerðartilboð til fremjarar. Eisini lá í ætlanini at bøta um møguleikan hjá yrkisbólkum at samstarva yvir um markamót, ikki minst upp ímóti harðskapsfakligheitini.

At vit sum samfelag hava flutt okkum rætta vegin, er eingin ivi um. Tó mugu vit ásanna, at tað framvegis er ein larmandi tøgnmentan kring harðskapin í parløgum og nærsambondum. Okkum tørvar at fáa skapt eitt mál fyri at kunna seta orð á harðskapin og soleiðis at fáa brotið tøgnina og lagt lunnar undir eina neyðuga hugburðsbroyting.

Lyklaorðið er menning. Menning av fakligari vitan innan harðskapin. Vit hava longu sett gongd á hetta arbeiðið, og starvsfólk í Kvinnuhúsinum hava við síni fakligu vitan gingið á odda. Teirra arbeiðsorka hevur tó ikki rokkið til at savna inn, menna og føroyska tilfar at brúka í vísindaligum kanningum, til upplýsing og kunning. Hetta verður tí eitt neyðugt næsta stig fyri at basa harðskapi.

Eitt afturvendandi evni er, at borgarar sóknast eftir, at tað er **eitt stað** at venda sær til, tá brúk er fyri hjálp. Tørvur er tí á einum staði við hollari fakligari vitan at venda sær til dulnevnt, bæði hjá harðskapsraktum, fremjarum, avvarðandi og – ikki minst – hjá fakfólki. Eftir tørvi skal tað frá hesum staði bera til at vísa á neyðugu hjálpina, sum eigur at verða tryggjað øllum harðskapsraktum.

Endamálið við hesi heildarætlan er, at vit sum samfelag støðugt arbeiða víðari við at upplýsa um og basa harðskapi. Fyri at fáa eitt nøktandi og upplýst grundarlag at arbeiða á og taka støðu út frá, hava bæði myndugleikar, felagsskapir og einstaklingar, luttikið við vitan, royndum og góðum ráðum, sum hava verið avgerandi fyri nýggju heildarætlanina. Øllum hesum takka vit hjartaliga.

**Sirið Stenberg**
**landsstýriskvinna**
í almanna- og mentamálum

**Bjarni Kárason Petersen**
**landsstýrismaður**
í lógarmálum

**Djóni Nolsøe Joensen**
**landsstýrismaður**
í barna- og útbúgvingarmálum

**Margit Stóra**
**landsstýriskvinna**
í heilsumálum

# Arbeiðið við heildarætlanini

Tilgongdin við hesi nýggju heildarætlan hevur meira enn eitt ár á baki. Hon byggir á eftirmeting av arbeiðinum av heildarætlanunum: Harðskapur í parlagi og nærsambondum, 2011, og Heildarætlan um kynsligan ágang, 2016[1]. Eisini er heildarætlanin grundað á harðskapskanning frá 2020, sum var løgd alment fram í mai 2021[2].

Eftirmetingin av undanfarnu heildarætlanunum mælir í stuttum til, at tað verður hildið fram við at basa harðskapi, og at tað beinanvegin verður farið undir at fyrireika eina nýggja heildarætlan um harðskap í parlagi og nærsambondum.

Arbeiðsbólkurin varð á fyrsta sinni settur í november 2022, men stígur kom í, tí løgtingsval varð útskrivað. Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, setti tó beinanvegin gongd aftur á arbeiðið og fekk í februar 2023 undirtøku í samgonguni til at fara undir eina nýggja heildarætlan.

Arbeiðið er lagt til fýra av stjórnarráðunum at standa fyri, umboðað við hesum landsstýrisfólkum:

- Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum
- Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum
- Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum
- Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Í arbeiðsbólkinum, sum í februar 2023 fór til verka, hava sitið:

- Anna Katrin Matras, fulltrúi í Almanna- og mentamálaráðnum, verkætlanarleiðari fyri Sig frá og forkvinna í arbeiðsbólkinum,
- Jákup Andrias Kristiansen, fulltrúi í Løgmálaráðnum,
- Høgni V. Warberg, fulltrúi í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, og
- Kristianna Balle, fulltrúi í Heilsumálaráðnum.

Aftur at arbeiðsbólkinum hevur verið knýttur ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum politisku flokkunum á tingi. Umboðini eru hesi:

- Hans Jacob Thomsen fyri Javnaðarflokkin,
- Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur fyri Fólkaflokkin,
- Liljan Weihe fyri Tjóðveldi,
- Johan Dahl fyri Sambandsflokkin
- Steffan Klein Poulsen fyri Miðflokkin og
- Sólvit E. Nolsø fyri Framsókn.

1 Eftirmetingin er gjørd innanhýsis í Almannamálaráðnum á heysti 2021
2 Viðurskifti sum ávirka lívsgóðskuna hjá føroyingum – úrslit frá kanning hjá Almannamálaráðnum, sum Fróðskaparsetrið hevur gjørt í samstarvi við Lóður



Seinastu 40 árini hevur verið arbeitt við at basa harðskapi, og hetta arbeiðið hevur ment seg nógv og er í dag kjølfest sum egið fakøki. Fyrstu nógvu árini varð arbeitt við tilboðum til harðskapsrakt, har serligur dentur varð lagdur á umsorgan og at skapa eitt friðskjól fyri harðskapsraktar kvinnur og børn teirra á kreppumiðstøðum. Rættiliga skjótt vísti seg tó ein tørvur á at hjálpa hesum kvinnunum á fleiri økjum – eitt nú í løgfrøðiligum, fíggjarligum, heilsuligum og sosialum viðurskiftum. Tørvur var á at hava fleiri ymisk sløg av ráðgeving, og tí varð ein ambulantur ráðgevingarpartur lagdur aftur at kreppumiðstøðunum[3].

Í Føroyum hevur í meira enn 30 ár verið arbeitt skipað við harðskapsøkinum gjøgnum virksemið hjá Kvinnuhúsinum í Havn. Talan var upprunaliga, eins og aðrastaðni, um, at kvinnur tóku stig til at seta á stovn eitt felag at arbeiða við harðskapi. Frá at bjóða kvinnum og børnum at búgva á Kreppumiðstøðini, er virksemið í dag víðkað til eisini at fevna um eina opna ráðgeving. Ráðgevingin hevur upplatingartíð í dagtímunum gerandisdagar og gevur harafturat møguleika fyri ráðgeving umvegis telefonina og netið[4]. Politiskt varð avgerð í fjør tikin um at styrkja og víðka ráðgevingarpartin, ítøkiliga til eitt *betri ambulant tilboð til harðskapsrakt*.

Ambulanta tilboðið leggur dent á at menna markamótið til fleiri ymsar myndugleikar, sum harðskapsrakt hava tørv á at samstarva við um støðu sína. Samstundis er talan um eitt tilboð, sum eisini er ætlað monnum. Arbeiðast má víðari við at styrkja og víðka hesa ambulantu harðskapsráðgeving við skjótari og betri tilboðum til harðskapsrakt.

Í 2011 fingu Føroyar fyrstu heildarætlanina um harðskap í parlagi og nærsambondum, ið var eitt samstarv millum landsstýrisfólk og tvørtur um stjórnarráð. Arbeitt hevur verið við átøkum á fleiri ymsum mótum, og dentur hevur verið lagdur á at upplýsa og kunna um harðskap, arbeiða við fyribyrging og veita stuðul til tey, sum eru fyri harðskapi, og tey, ið fremja harðskap. Í 2016 varð heildarætlanin víðkað við serligum átøkum í mun til kynsligan ágang, m.a. var nú eisini viðgeratilboð til tey, ið hava seinárin av kynsligari misnýtslu. Fleiri av átøkunum vórðu skipað eftir einum leisti, ið ikki var grundað í harðskapsøkinum. Ábyrgdin varð í høvuðsheitum løgd til stjórnarráð at fremja átøkini, heldur enn at fáa tey grundfest í verandi myndugleikar, fakstovnar og til tey, ið virka á markamótinum til harðskap. Ein vansi við hesum er, at átøkini verða til symptomviðgerð, heldur enn miðvís stig til at bera harðskapsfakligheitina fram á leið. Samanumtikið skal henda heildarætlanin byggja víðari á væleydnaðu royndirnar frá fyrru heildarætlanunum og á tær royndir, ið eru mentar innan harðskapsøkið í Føroyum, eins og tær, ið eru mentar uttanlands[5].

Hetta tíðarskeiðið, ið arbeiðsbólkurin hevur virkað, hevur í fyrstu syftu verið arbeitt við at fyrireika tilgongdina. Í tíðarskeiðinum mars-apríl 2023 hevur verið skipað fyri hoyringum við heili 32 partar[6]. Talan hevur m.a. verið um partar á útbúgvingarøkinum, fakligheitir frá stovnsøkinum, heilsuøkinum, kommunala økinum, undirvísingarøkinum og við felagsskapir, ið hava eitt markamót beinleiðis til harðskapsøkið og føroysku harðskapsfakligheitina. Tað er við støði í hesum, at hetta tilmælið við 20 átøkum er fyrireikað.

3 Oldrup, H. 2020, Vold i familein – viden for fagfolk, Akademisk forlag
4 kvinnuhusid.fo
5 Oldrup, H. 2020, Vold i familien – viden for fagfolk, Akademisk forlag
6 Sí fylgiskjal 1

# Eitt lív í harðskapi

## Lóggáva um harðskap

Tað er ikki nógv lóggáva í Føroyum, sum beinleiðis ella burturav snýr seg um harðskap. Viðkomandi reglur eru tó at finna í revsilógini og í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Sambært revsilógini er tað revsivert at fremja ávís sløg av harðskapi móti øðrum persónum, meðan løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ásetur tilboð og tænastur til tey, ið eru fyri harðskapi.

### Revsilógin

Føroyska revsilógin ásetur í §§ 244, at hann, ið við harðskapi ger seg inn á ein annans likam, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár.

Ásetingin fevnir um vanligan harðskap, t.d. slag við knýttum neva, spark og ógvuslig skump. Ásetingin fevnir eisini um aðrar gerðir, sum ikki neyðturviliga hava pínu við sær, t.d. at klippa hárið av einum øðrum persóni ella at spýta ein annan persón í andlitið.

§ 245, stk. 1, ásetur, at hann, ið ger seg sekan í serliga ráum, grovum ella vandamiklum likamsálopi ella mishandling, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.

Ásetingin fevnir um tað, ið á løgfrøðiligum máli verður kallað „grovur harðskapur“ ella „kvalificeraður harðskapur“. Ásetingin fevnir t.d. um harðskap, ið verður framdur við skotvápnum og knívum.

Ásetingin í § 245 fevnir sum nevnt eisini um mishandling. Harðskapur, sum er framdur yvir eitt tíðarskeið, og har ofrið er í einari undirlutastøðu og/ella onkursvegna er bundið at gerningspersóninum, er at meta sum mishandling. Áhaldandi harðskapur ímóti maka ella børnum kann t.d. koma undir henda partin av ásetingini.[7]

### Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur

§ 44 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, sum kom í gildi 1. januar 2021, er soljóðandi:

„§ 44. Fyribils gisting á kreppumiðstøð, umsorgan, ráð og vegleiðing verður veitt persóni vegna harðskap í parlagi ella nærsambondum.

*Stk. 2.* Kreppumiðstøðin tekur avgerð um innskriving.

*Stk. 3.* Persónur, ið gistir á kreppumiðstøð, rindar fyri uppihaldið.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur og kann veita fíggjarligan stuðul til kreppumiðstøð, sambært stk. 1, eftir nærri ásettum treytum.“

Í viðmerkingunum til ásetingina verður sagt, at heimildin í § 44 fevnir um bæði kvinnur og menn, ið hava tørv á hjálp vegna harðskap, men at higartil er kreppumiðstøð bara skipað fyri kvinnur og børn í Kvinnuhúsinum í Havn.

Viðmerkingarnar til ásetingina lýsa eisini í ávísan mun tað virksemið og tey tilboð, sum Kvinnuhúsið bjóðar, herímillum ráðgeving, vegleiðing, samrøður og sálarfrøðiligar viðtalur til persónar, sum hava verið fyri harðskapi í parlagi ella nærsambondum, umframt bólkasamrøður, ið hava til endamáls at veita hjálp til sjálvhjálp.[9]

Av tí, at tilboðini ikki verða nevnd í sjálvum lógartekstinum, men bara í viðmerkingunum til ásetingina, hava kvinnur og børn í dag ikki nakran lógarfestan rætt til t.d. sálarfrøðiliga viðgerð í sambandi við uppihaldið í Kvinnuhúsinum.

## Lívið við harðskapi

Menningin innan harðskapsfakligheitina hongur neyvt saman við áskoðanunum og royndunum við harðskapi, sum samfeløgini hesi árini hava havt. Tað er ein sannroynd, at harðskapur er eitt samansett fyribrigdi við ymiskum fatanum av bæði harðskapinum, hví hann byrjar, og hvussu hann kann basast[10].

7 Kommenteret straffelov, Speciel del, 9. udgave 2008, s. 358-368.
8 Viðurskifti sum ávirka lívsgóðskuna hjá føroyingum – úrslit frá kanning hjá Almannamálaráðnum, sum Fróðskaparsetrið hevur gjørt í samstarvi við Lóður
9 LM-079/2019, s. 124-125.
10 Oldrup., H 2020, Vold i familien – mod et mere differentieret fagligt felt, í Vold i familien – viden for fagfolk, s. 30-37



## Hvat er harðskapur?

Harðskapur er ein gerð ella ein hóttan, ið ger seg inn á sjálvræðisrættin hjá einum persóni, ella sum elvir til pínu, skaða ella ótta – sama um talan er um børn ella vaksin. Harðskapur kann hava somu ávirkan á tey, sum eru vitni til harðskapin. Harðskapur kann annaðhvørt vera tilætlaður ella framdur í sinnisrørslu.[11]

Fyrstu árini vóru tvær høvuðsfatanir av, hvussu harðskapur tekur seg upp í familjuni: tann fyrra var fatanin, sum er grundað á tað samfelagsliga kynsperspektivið og maktstrukturar. Henda fatan knýtti seg til harðskap, ið var framdur av monnum móti kvinnum. Hin seinna var grundað á ta áskoðan, at tað er sjálv skipanin av familjuni, sum er avgerandi. Familjan er í eini relatión við sínum egnu mørkum og mátum at samskifta, og tað eru hesir faktorarnir, sum eru við til bæði at skapa og bróta niður aftur harðskapin.

Sálarligar sjúkur hava ofta verið settar í samband við harðskap, har tað hevur verið mett, at upplivingar við harðskapi frá barnaárum ávirka persónar til at brúka harðskap sum vaksin. Harðskapur hevur eisini verið settur í samband við tey sosialt marginaliseraðu, sum liva í fátækdømi, arbeiðsloysi o.s.fr. Men veruleikin er, at orsøkirnar til harðskapin eru samansettar, og harðskapur fer fram í øllum samfelagsløgum.

Nýggjasta ástøðið hevur eitt sonevnt responserað perspektiv við. Her verður harðskapurin lýstur í einum samspæli millum øðrumegin tann harðskapsrakta, fremjaran og avvarðandi, sum eru vitnini, og hinumegin vegleiðing, hjálp og stuðulsátøk, sum myndugleikar og hjálparfelagsskapir bjóða. Tað er í hesum samspælinum, at orð verða sett á harðskapin, og her hann verður fataður, góðtikin ella steðgaður.

Átøk at steðga harðskapi eru við árunum býtt sundur og vísa seg í dag sum átøk fyri harðskapsrakt og átøk fyri fremjara. Slík átøk verða eisini skipað við hotline-skipanum. Har kunnu harðskapsrakt, fremjarar, avvarðandi, fakfólk og onnur venda sær. Har fáa tey eina fyrstu ráðgeving og kunnu verða víst til víðari ráðgeving, eisini til løgfrøðiliga og sálarliga hjálp. Samstundis verður alt størri dentur lagdur á týdningin av at fáa vitan um økið at brúka fyribyrgjandi til upplýsing og kunning. Hetta er eitt neyðugt stig fyri at skumpa undir eina hugburðsbroyting á harðskapsøkinum. Eisini verður støðan hjá harðskapsraktum í dag hugsað í einum longri perspektivi. Nú verður farið víðari frá at hjálpa við ráðgeving, vegleiðing og tilhaldi á kreppumiðstøð, til at fylgja tí harðskapsrakta í síni tilgongd til eitt lív uttan harðskap við eftirvernd. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at harðskapsrakti persónurin megnar at liva lív sítt uttan harðskap.

Nýggjastu átøkini við ambulantari harðskapsráðgeving er eitt tilboð, sum m.a. vísir seg at røkka nógv breiðari út í samfelagið. Hetta sæst í eftirmetingini av royndarverkætlanini „Sig det til nogen“, sum hevur verið í gongd í Danmark síðani 2018[12]. Tað vísir seg, at ein stórur partur av teimum, sum søkja sær hjálp í ambulantu ráðgevingini, at síggja til eru væl fyri fíggjarliga, hava útbúgving og liva í føstum parløgum. Hóast tey hava livað við harðskapi í áratíggju, so síggja tey ikki seg sjálv sum partar av tilboðnum á eini kreppumiðstøð. Við hesum nýggja

11 https://sbst.dk/voksne/vold-i-naere-relationer/viden-om-vold
12 Andersen, A. T. & Smidt, L.B., 2022, Et sprog om vold – En analyse af voldsfagligheden i Sig det til nogen – set ud fra de voldsudsatte kvinders perspektiv, Oxford research

# Hvønn fevnir heildar-ætlanin um?

Heildarætlanin fevnir um harðskap í parlagi og nærsambondum. Hugtakið parlag fevnir í hesum sambandi um bæði gift og ógift pør, sum kunnu búgva saman ella búgva hvør sær. Hugtakið fevnir eisini um fyrrverandi parløg. Persónar í parløgum, sum eru merkt av harðskapi, eiga ofta børn. Børnini liva tá eisini í harðskapi. Harðskapurin kann hava álvarsligar sálarligar, sosialar og likamligar fylgjur fyri børnini. Børnini eru eisini fevnd av heildarætlanini. Sama ger seg galdandi fyri onnur nærsambond, eitt nú foreldur, systkin ella onnur í familjuni, sum annaðhvørt kenna fremjaran ella tann harðskapsrakta. Somuleiðis kunnu vinir og starvsfelagar, ið eru í tøttum sambandi við harðskapsrakt, vera avvarðandi.

ambulanta tilboðnum er tí møguleiki fyri at røkka út til at hjálpa fleiri fólkum nógv fyrr í tilgongdini, og er hetta samstundis ein størri trygd fyri tann harðskapsrakta.

Við hesi verkætlanini er samstundis staðfest, at skal hjálpin til harðskapsrakt styrkjast, er neyðugt alla tíðina at menna harðskapsfakligheitina. Í ráðgevingararbeiðinum skal støðugt arbeiðast við at finna røttu mannagongdirnar og amboðini til at hjálpa harðskapsraktum at viðurkenna harðskapin, at handfara støðuna og teir sálarligu løstir, sum fylgja við, og til at megna at seta sær nýggj mál uttan harðskap.

### Hjálpin til harðskapsrakt

Í Føroyum eru tilboð til harðskapsrakt skipað í Kvinnuhúsinum, sum síðani 1990 hevur hildið til í leigaðum hølum í KFUM. Arbeiðið í Kvinnuhúsinum er grundað á hjálp til sjálvhjálp.

Virksemið er skipað við Kreppumiðstøðini, ið er eitt friðskjól til harðskapsraktar kvinnur og børn í eitt avmarkað tíðarskeið, og eini harðskapsráðgeving, ið er eitt ambulant tilboð, ætlað kvinnum og monnum og teirra avvarðandi.

Dagliga starvast leiðari og tríggir ráðgevar/starvsfólk í Kvinnuhúsinum. Hesi hava námsfrøðiligar og sosialfakligar útbúgvingar og hollar royndir at arbeiða við menniskjum í kreppu.

Harðskapsráðgevingin hevur opið gerandisdagar frá kl. 9 til 16. Hesar tímarnar ber til hjá harðskapsraktum at ringja og fáa vegleiðing/ráðgeving umvegis telefon, ella at fáa eina tíð til persónliga viðtalu. Eisini er møguligt at senda teldupost ella boð á sosialu miðlunum.

Kvinnur kunnu venda sær til Kreppumiðstøðina alt samdøgrið. Hetta ber til, tí umframt starvsfólkini eru 35 sjálvbodnar kvinnur við í eini vaktarskipan. Hesar kvinnur hava vakt frá kl. 17 gerandisdagar og til næsta morgun, eisini alt vikuskiftið. Eftir kl. 16 eru dyrnar læstar, men telefonin svarar alt samdøgrið.

### Hagtøl úr Kvinnuhúsinum

Í Kvinnuhúsinum verða dagliga førd hagtøl yvir áheitanir. Tær flestu áheitanirnar koma úr Føroyum, men nakrar áheitanir eru eisini úr útlondum. Í ársfrágreiðingini fyri 2022 vóru tilsamans 949 áheitanir, og av hesum vóru á leið helvtin, t.e. 426, beinleiðis





# Hvat er harðskapur í parlagi?

Eyðkenni er harðskapur millum tveir partar, sum hava eina relatión. Grundleggjandi er harðskapur í parlagi samantvinnaður við makt. Relatiónin er ikki í javnvág, tí annar parturin hevur vald á hinum. Vit vita, at harðskapurin verður framdur av báðum kynum og móti báðum kynum. Samstundis vita vit, at nógv tann største parturin av fremjarum eru menn, og at menn fremja grovari og meira likamligan harðskap, enn kvinnur gera. Harðskapur í parlagi versnar oftast við tíðini og verður bæði grovari og gerst títtari. Eitt parlag við harðskapi varir ofta í áravís, har harðskapurin spakuliga verður verri og verri. Til endans kann hetta kosta mannalív[13].

um harðskap. Áheitanirnar eru býttar á 421 kvinnur og 5 menn. Saman við kvinnunum eru skrásett tilsamans 529 børn.

Verður hugt eftir orsøkunum til áheitanirnar, skal fyrilit takast fyri, at sami persónur kann hava vent sær við fleiri ymiskum orsøkum til harðskapstrupulleikan; tí samsvarar talið av áheitanum ikki við talið av orsøkum. Í skrásetingini er talan um, at fleiri ymiskar orsøkir verða skrásettar. Velja vit tær orsøkirnar, har tann harðskapsrakta vísir til sløg av harðskapi, sær býtið soleiðis út:

| Tal av áheitanum | Orsøk |
|---|---|
| 107 | Likamligur harðskapur |
| 326 | Sálarligur harðskapur |
| 48 | Fíggjarligur harðskapur |
| 53 | Materiellur harðskapur |
| 83 | Tráelting |
| 182 | Hóttanir um harðskap |
| 14 | Annar harðskapur (t.d. útleigari, arbeiðsgevari o.o.) |

Her sæst, at sálarligur harðskapur er nógv tann største orsøkin, og at orsøkirnar hóttanir um harðskap og likamligur harðskapur somuleiðis liggja høgt.

Vert er eisini at taka við, at 52 áheitanir eru orsakað av mentanarmuni í parlagnum. Talan er um mun í tjóðarmentan, vanliga tá útlendsk kvinna er saman við føroyskum manni.

Sum partur av viðtaluni verður spurt um, *hvør fremur harðskapin*, og er myndin tá henda:

| | |
|---|---|
| 143 | Makin |
| 108 | Fyrrverandi makin |
| 9 | Foreldur, systkin ella børn |
| 23 | Onnur |
| 138 | Ikki upplýst |

13 https://www.lokk.dk/viden-om-vold/hvad-er-vold/definitioner/

## Áheitanir til kvinnuhúsið, býtt á aldur

| Aldursbýtið á kvinnum | |
|---|---|
| 1 | Yngri enn 18 |
| 5 | 18 – 19 ár |
| 58 | 20 – 29 ár |
| 79 | 30 – 39 ár |
| 109 | 40 – 49 ár |
| 43 | 50 – 59 ár |
| 14 | 60 ár og eldri |
| 112 | Ikki upplýst |
| **Aldursbýtið á monnunum:** | |
| 5 | 30 – 39 ár |
| **Aldursbýtið á børnunum:** | |
| 77 | 00 – 02 ár |
| 86 | 03 – 06 ár |
| 68 | 07 – 10 ár |
| 27 | 11 – 14 ár |
| 54 | 15 – 18 ár |
| 182 | Yvir 18 ár |
| 35 | Ikki upplýst |

# Nær er ein persónur fyri harðskapi?

Ein persónur er fyri harðskapi, tá viðkomandi skal laga seg eftir krøvum hjá einum øðrum persóni á ein hátt, har viðkomandi verður noyddur út um síni egnu mørk. Harðskapur kann vera kropsligur og harvið sjónligur, men harðskapur kann eisini vera duldur. Talan kann t.d. vera um sálarligan, kynsligan, materiellan ella fíggjarligan harðskap[14].

## Gistingar á Kreppumiðstøðini

Sum nevnt er eitt tilboð til harðskapsraktar kvinnur, at tær, í eitt tíðarskeið, og saman við møguligum børnum, kunnu búgva á Kreppumiðstøðini í Kvinnuhúsinum. Støðan kann vera brádliga íkomin, har tað verður flutt beint inn, ella at tað í viðtaluni á Harðskapsmóttøkuni er semja um, at tørvur er á hesum, og at kvinnan tá fær tíð til at umhugsa sína støðu.

Í 2022 hava 13 kvinnur og 11 børn gist á Kreppumiðstøðini í tilsamans 140 samdøgur. Kvinnurnar vóru í aldursbólkinum frá 20 til 60 ár og eldri. Aldurin á børnunum var millum 3 og 14 ár. Tað eru oftast tey yngstu børnini, ið gista saman við mammuni. Av teimum 13 kvinnunum gistu fimm kvinnur á Kreppumiðstøðini fyri fyrstu ferð, ein fyri aðru ferð og tvær fyri triðju ferð ella oftari. Talið er ikki upplýst fyri tær seinastu fimm kvinnurnar.

Kvinnurnar fáa boðið egið kamar og atgongd til felags køk, stovu og wc/bað. Kvinnurnar gjalda 50 kr. fyri gisting pr. samdøgur. Tær keypa sjálvar inn, gera sjálvar mat, gera reint og vaska klæði. Kvinnurnar fáa ein fastan kontaktpersón tillutaðan millum starvsfólkini. Tær fáa ráðgeving og vegleiðing við psykoedukation[15] sum hjálp til at fata harðskapin og dynamikkirnar í harðskapinum. Hetta merkir, at kvinnurnar verða eggjaðar til at siga sína søgu sum hjálp til at síggja, hvørjum tær hava verið úti fyri. Eisini fáa tær bjóðað ókeypis viðtalu hjá sálarfrøðingi.

Skrásetingin vísir, at menninir, ið fremja harðskap, eru úr øllum samfelagsstættum og finnast í øllum aldursbólkum.

Eisini vísa hagtølini, hvørja relatión kvinnan hevur til fremjaran:

14 https://kvinnuhusid.fo/um-hardskap/hvat-er-hardskapur/

15 Psykoedukation er í hesum samanhangi at læra um harðskapin og um, hvussu harðskapurin ávirkar livið hjá tí rakta og hjá teimum avvarðandi. Samstundis verður tú upplærdur í, hvussu tú skalt handfara støðuna og kanst koma burtur úr harðskapinum.



| | |
|---|---|
| 7 | hjúnafelagi/sambúgvi/unnusti |
| 4 | fyrrverandi hjúnafelagi/ sambúgvi/unnusti |
| 2 | annar (foreldur, systkin ella børn) |

Tann harðskapsrakti upplivir oftast fleiri sløg av harðskapi. Býtið av sløgum av harðskapi fyri kvinnur á Kreppumiðstøðini sær soleiðis út:

| | |
|---|---|
| 6 | hava verið fyri likamligum harðskapi |
| 12 | hava verið fyri sálarligum harðskapi |
| 11 | hava verið fyri hóttanum |
| 4 | hava verið fyri fíggjarligum harðskapi |
| 1 | hevur verið fyri materiellum harðskapi |
| 3 | hava verið fyri tráelting |
| 1 | hevur verið fyri kynsligum ágangi ella blóðskemd |

Kvinnurnar siga, at orsøkin til, at maðurin fremur harðskap, er:

| | |
|---|---|
| 1 | partvíst uppvøkstur |
| 1 | ástarøvund |
| 1 | undirlutakenslur |
| 2 | misnýtsla |
| 6 | ymisk mentan |
| 2 | ikki upplýst |

| Gistingardøgn (vaksin + børn): | |
|---|---|
| 4 | 1 – 7 samdøgur |
| 1 | 7 – 14 samdøgur |
| 1 | 14 – 28 samdøgur |
| 4 | 30 – 60 samdøgur |
| 3 | yvir 60 samdøgur |
| **Aldur:** | |
| 3 | 20 – 29 ár |
| 5 | 30 – 39 ár |
| 4 | 40 – 50 ár |
| 0 | 50 – 59 ár |
| 1 | 60 ár og eldri |
| **Aldur á børnunum:** | |
| 0 | 00 – 03 ár |
| 7 | 04 – 06 ár |
| 3 | 07 – 10 ár |
| 1 | 11 – 14 ár |
| **Flyting av Kreppumiðstøðini:** | |
| 3 | til nýggjan búðstað |
| 2 | til foreldur |
| 2 | á viðgerðarstovn |
| 6 | annað |
| **Melda til løgregluna:** | |
| 2 | fóru ikki at melda |
| 2 | vildu melda |
| 9 | ikki upplýst |

# Hvat er harðskapsøkið?

Harðskapsøkið fevnir um allan tann samtekstin (kontekstin), sum harðskapsrakt, fremjarar og avvarðandi eru í, umframt tey fakfólk og tær skipanir, sum skulu hjálpa og stuðla hesum bólkum.



# Harðskapur kann vísa seg sum:

Við harðskapi er aloftast talan um eitt mynstur av valdsatburði heldur enn einstakar hendingar. Tað merkir, at harðskapur í parlagi og nærsambondum kann vera ein samanseting av ymiskum atburði, sum ikki altíð er týðiligur harðskapur ella beinleiðis lógarbrot. Niðanfyri verður harðskapur býttur upp í sjey ymisk sløg. Harðskapsrakt eru oftast rakt av fleiri sløgum av harðskapi samstundis.

**Sálarligur harðskapur:** Tá ið ein sjálvur ella børnini eru hótt við harðskapi, rópt eftir, stýrd og undir eftirliti, avbyrgd frá øðrum menniskjum og áhaldandi niðrað, villeidd, funnist at og skúgvað til viks. Sálarligur harðskapur kann vera torførur hjá tí harðskapsrakta at prógva, tí hann hevur eingi sjónlig spor við sær. Hóast hetta er sálarligur harðskapur sera skaðiligur og niðurbrótandi. Sálarligur harðskapur er altíð til staðar, har onnur sløg av harðskapi eru[16]. Tað vil siga, at tað ber ikki til at fremja t.d. likamligan harðskap ella kynsligan harðskap uttan samstundis at fremja sálarligan harðskap.

**Likamligur harðskapur:** At verða sligin, bukað/ur, skumpað/ur, kastað/ur, hildin, pínd/ur, sparkað/ur, ella har vápn ella onnur amboð verða brúkt. Tað er eisini kropsligur harðskapur at verða sýttur atgongd til ves, ikki at fáa at eta og drekka, ella ikki at sleppa at sova.

**Kynsligur harðskapur:** At verða tvungin at hava kynsligt samband, ella vera við í kynsligum gerðum. Tað kann vera, at ein verður noydd/ur til samlegu ella aðrar kynsligar gerðir, ið ein ikki ynskir at luttaka í.

**Materiellur harðskapur:** At uppliva, at ognarlutir verða oyðilagdir, t.d. heim, innbúgv, klæðir ella bilur. Materiellur harðskapur kann eisini vísa seg við, at tann, ið fremur harðskapin, tveitir tann harðskapsrakta á dyr, uttan at lata viðkomandi fáa nakað við sær, og harvið gera tað torført hjá tí harðskapsrakta at seta búgv av nýggjum.

**Fíggjarligur harðskapur:** At verða forðað/ur fyri at umsita sín egna pening og harvið vera fíggjarliga avmarkað/ur, eitt nú ikki at hava pening til mat og aðrar gerandisvørur. Ofta vil talan vera um, at annar parturin í einum parlagi krevur, at hin parturin gevur viðkomandi allar sínar pengar. Tað er eisini fíggjarligur harðskapur at verða trýst/ur til at taka eitt lán í bankanum.

**Tráfylging/stalking:** Tráfylging er ein serlig grein av sálarligum harðskapi, har tú skipað verður útsett/ur fyri óynsktum og endurtiknum eftirliti, forfylging og plágan, sum kann halda á í nakrar vikur ella upp til fleiri ár[17].

**Talgildur harðskapur:** Er harðskapur, har talgilding er amboðið til at fremja harðskapin. Talan kann t.d. vera um, at myndir ella filmsbrot, send í trúnaði, verða lutað á netinum uttan samtykki frá persóninum, sum er á myndunum. Talan kann eisini vera um, at persónligar upplýsingar verða lutaðir alment, ella skemmandi atferð á til dømis sosialum miðlum ella á telefonini. Talan er eisini um talgildan harðskap, tá ið ein persónur hevur eftirlit við teldupostti, vangum á sosialum miðlum og/ella telefonini hjá einum persóni ella t.d. setur útgerð á bilin fyri at fylgja slóðini hjá persóninum.

16 Idrup, H. 2020, Vold i familien – viden for fagfolk, Akademisk forlag
17 Dali, Eydis í, 2018, #STOP STALKING – Sådan håndterer du en stalker

## Tilmælini í Heildarverkætlanini um harðskap í parlagi og nærsambondum 2023-2028

| | | | | Kostnaður skipað á ár | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nr** | **Bólkur** | **Átak** | **Ábyrgdari** | **2023** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** | **2028** | **Tíðarætlan** |
| | **At upplýsa og fyribyrgja harðskapi** | | | | | | | | | |
| 1 | | Upplýsandi átak um harðskapsfakliga økið fyri fólk, sum vilja vita meira um harðskap í parløgum og nærsambondum | Kvinnuhúsið | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 5.000 | Hvørt ár |
| 2 | | Upplýsandi og fyribyrgjandi átøk, ið venda sær til børn | AMMR, SSP, Barnaverndar-stovan/Barnahúsið, Kvinnuhúsið | | 75.000 | | 75.000 | | 35.000 | Annaðhvørt ár |
| 3 | | Upplýsandi og fyribyrgjandi átøk, ið venda sær til ung | AMMR, Kvinnuhúsið | | 75.000 | | 75.000 | | 35.000 | Annaðhvørt ár |
| 4 | | Upplýsandi og fyribyrgjandi átøk, ið venda sær til almenningin | AMMR, Kvinnuhúsið | | 75.000 | | 75.000 | | 35.000 | Annaðhvørt ár |
| 5 | | Upplýsandi tilfar til tilflytarar skal dagførast | AMMR, Kvinnuhúsið | | 10.000 | | | 10.000 | | 2024 - 2027 |
| | | | | **10.000** | **245.000** | **10.000** | **235.000** | **20.000** | **110.000** | |
| | **Átøk sum stuðul til harðskaparrakt** | | | | | | | | | |
| 6 | | Víðka tilboðið um sálarfrøðiviðgerð til harðskapsrakt til aðrar málbólkar | Harðskapsmóttøkan | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 25.000 | Hvørt ár |
| 7 | | Víðka tilboðið um sjálvhjálparbólkar til aðrar málbólkar | Harðskapsmóttøkan | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 10.000 | Hvørt ár |
| 8 | | At menna eitt tilboð um eftirvernd til harðskapsrakt | Harðskapsmóttøkan | | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 25.000 | Hvørt ár |
| 9 | | Sálarfrøðiviðgerð til harðskapsrakt børn | Barnahúsið | 50.000 | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 75.000 | Hvørt ár |
| 10 | | At kriminalisera sálarligan harðskap og tráfylging | LMR | | | | | | | 2025 |
| 11 | | At lógartryggja tilboð og tænastur til harðskapsrakt | AMMR | | | | | | | 2024 |
| | | | | **120.000** | **270.000** | **270.000** | **270.000** | **270.000** | **135.000** | |
| | **Átøk, ið venda sær til yrkisbólkar** | | | | | | | | | |
| 12 | | Eitt samstarv við avvarðandi útbúgvingarstovnar, um at fáa harðskapsfakligheit inn í útbúgvingarnar til: lærara, námsfrøði, námsfrøðihjálpara, heilsurøktara, heilsuhjálpara og sjúkrarøktarfrøði. | BUMMR, AMMR, Kvinnuhúsið, Fróðskaparsetur Føroya, Heilsuskúli Føroya | | 30.000 | 30.000 | | | | 2024-25 |
| 13 | | At skipa fyri undirvísing til sjálvbodnar vaktir í Kvinnuhúsinum | Kvinnuhúsið | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 7.500 | Hvørt ár |
| 14 | | At skipa fyri undirvísing fyri stovnum, felagsskapum og myndugleikum um harðskap og markamót | BUMMR; AMMR, Kvinnuhúsið | | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 15.000 | Hvørt ár |
| 15 | | Við verkstovum at styrkja samstarv yvir um geirar og markamót | HMR; AMMR, BUMMR, LMR, Kvinnuhúsið | 100.000 | | | | | | 2023 |
| 16 | | Framleiðsla av tilfari í samstarvi við Nám | AMMR/NÁM/Kvinnuhúsið | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 25.000 | Hvørt ár |
| | | | | **165.000** | **125.000** | **125.000** | **95.000** | **95.000** | **47.500** | |
| | **Átøk at lætta um atgongdina til hjálp í sambandi við harðskapin** | | | | | | | | | |
| 17 | | Hjálparlinja/hotline – dulnevnd harðskapsráðgeving við telefon, kjat, telduposti og heimasíðu, íroknað sálarfrøðiviðgerð til fremjarar | AMMR; Hotline | | 300.000 | 300.000 | 300.000 | 300.000 | 300.000 | Hvørt ár |
| | | | | | 300.000 | 300.000 | 300.000 | 300.000 | 300.000 | |
| | **Átøk at stuðla undir vísindaligum kanningararbeiði innan harðskapsøkið** | | | | | | | | | |
| 18 | | Harðskapsfakligt starvsfólk í Kvinnuhúsið – at arbeiða við átøkum og menning av vísindadeildini burturav, tíðaravmarkað starv fram til 2028 | Kvinnuhúsið | | 600.000 | 600.000 | 600.000 | 600.000 | 300.000 | Eitt 4 ára skeið |
| 19 | | Vitanardepil at savna, menna og føroyska undirvísingartilfar innan harðskapsfakligheit | Kvinnuhúsið | | | | | | | Hvørt ár |
| 20 | | Vísindaligar kanningar innan harðskapsøkið | AMMR, Kvinnuhúsið og Fróðskaparsetur Føroya | 200.000 | 300.000 | 300.000 | 300.000 | 300.000 | 150.000 | Hvørt ár |
| | | | | **200.000** | **900.000** | **900.000** | **900.000** | **900.000** | **450.000** | |
| | | | **Samanlagt kr.** | **495.000** | **1.840.000** | **1.605.000** | **1.800.000** | **1.585.000** | **1.042.500** | |

# Yvirskipað um átaksøkini

Talgildingin seinastu fjórðingsøldina hevur kollvelt sambandið millum manna bæði í samskiftis- og í miðlaháttum. Í arbeiðssetninginum varð staðfest, at tað var tørvur á at hugsa tað talgilda amboðið sum ein part av hesi heildarætlanini.

Talgildur harðskapur fevnir t.d. um støður, har intimar myndir og filmar, ið eru send í trúnaði, verða deild á netinum uttan samtykki frá tí, sum er á myndini. Talan kann eisini vera um, at vangamyndir verða kliptar inn í pornografiskt tilfar, sum sær ektað út.

Tað er eisini talgildur harðskapur, um privatar upplýsingar verða deildar alment, ella um ein persónur er fyri skemmandi atferð á t.d. sosialum miðlum.

Talan er eisini um talgildan harðskap, tá ið ein persónur hevur eftirlit við telduposti, vangum á sosialum miðlum og/ella telefonini hjá einum persóni ella t.d. setur útgerð á bilin fyri at fylgja slóðini hjá persóninum.

Talgildur harðskapur er ofta til staðar í parløgum og nærsambondum, sum eru rakt av øðrum sløgum av harðskapi, t.d. likamligum og sálarligum harðskapi. Talan er um eitt amboð til at hava ræði á teimum harðskapsraktu og at halda teimum føstum í harðskapinum[18].

Meðan annar harðskapur, eitt nú tann likamligi, ofta fer fram í heiminum, hevur talgildi harðskapurin ein altjóða pall uttan fysisk mørk, eitt nú á Facebook, Instagram og Snapchat, har ofrið vanliga hevur síni sosialu sambond.

Talgildi harðskapurin kann skaða umdømið hjá ofrunum, tignina á arbeiðsplássinum og kann enntá skaða møguleikarnar fyri framtíðar starvsmøguleikum. Óttin fyri, at tilfar verður deilt víða um á alnetinum, og at familja og vinir síggja tað, ger, at tann harðskapsrakti alla tíðina má vera á varðhaldi og sostatt illa fær livað eitt vanligt lív. Hetta kann hava við sær sjúkrameldingar, sjálvisolatión og arbeiðsloysi[19].

Tað er ein sannroynd, at børn og ung eru partur av tí talgilda harðskapinum, ið fer fram í dag, og at tey ikki altíð skilja avleiðingarnar og skaðan, sum harðskapurin kann hava við sær. Tí er tað ein skylda hjá okkum sum samfelag at læra børn og ung um talgilda atferð og dannilsi, frá tí at tey taka fyrstu stigini inn í talgilda heimin.

Somuleiðis eiga vit at kunna alment um hetta slagið av harðskapi. Partar av talgilda harðskapinum eru longu nú lógarbrot, og fylgir tí revsing við. Tað er upp til ákæruvaldið at taka støðu í hvørjum einstøkum føri.

Vit mugu leggja dent á at tryggja, at vit sum samfelagsborgarar liva saman í einum virðiligum sambandi, har bæði dreingir og gentur, menn og kvinnur vísa javnbjóðis virðing, bæði í vanliga gerandisdegnum og í talgilda heiminum.

## Samanfallandi avbjóðingar

Eftir hoyringarfundirnar var tað greitt fyri arbeiðsbólkin, at fleiri av avbjóðingunum, sum hoyringarpartarnir vístu á, ikki avmarka seg til harðskapsøkið burturav. Heldur er talan um yvirskipaðar og víðfevndar avbjóðingar, sum standast av samstarvinum tvørtur um geirar, eins og við trivnaði og mistrivnaði hjá børnum og ungum sum heild. Hetta hava fyrri heildarverkætlanir longu víst á, og valdi arbeiðsbólkurin tí at taka støðið í tí arbeiði, sum longu er gjørt, og sum vísir á týdningin av, at ávís átøk verða sett í verk fyri at styrkja júst henda partin í arbeiðinum. Dømi eru í heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028 og í heildarætlanini fyri sálarliga heilsu í Føroyum 2018, har mælt verður til átøk, sum somuleiðis kundu bøtt um viðurskifti, ið hoyringarpartar til harðskapsheildarætlanina hava víst á.

Tilsamans er talan um 25 ymisk átøk úr hesum heildarætlanum, og sum arbeiðsbólkurin mælir til at seta í verk, sí fylgiskjal 3. Hesi átøkini snúgva seg um at bøta um trivnaðin hjá børnum og ungum, at gera skipanir, ið varnast mistrivnað tíðliga, og um at stuðla og vegleiða foreldrum at vera røttu fyrimyndirnar fyri síni børn. Talan er sostatt um átøk, ið kunnu vera við til at fyribyrgja harðskapi í nærsambondum og parløgum.

## Uppbýtið av átøkum í økir

Aftur at hesum er eisini neyðugt við átøkum, sum beinleiðis eru ætlað til harðskapsøkið. Fyri at kunna skilja, varnast og fyribyrgja harðskapi krevjast átøk, sum seta sjóneykuna á harðskapin sum sjálvstøðugt fyribrigdi. Við øðrum orðum er neyðugt at fáa meira vitan um harðskapin sum eitt øki fyri seg. Samstundis er tað avgerandi, at tilboð um viðgerð, hjálp og tænastur til harðskapsrakt altíð verða grundað á yrkisføri og vitan, og sum partvíst longu er innan harðskapsøkið í Føroyum.

Skipanin og uppbýtið av hesi heildarætlanini líkist nógv teirri fyrru, serliga trý tey fyrstu átaksøkini.

Fyrsta økið, *At upplýsa og fyribyrgja harðskapi*, leggur seg eftir at fyribyrgja harðskapi við upplýsingarátøkum. Átøkini venda sær til børn, ung og vaksin og um útlendskar kvinnur.

Annað økið, Átøk*, sum stuðul til harðskapsrakt*, fevnir um átøk, sum í stóran mun skulu styrkja og menna verandi arbeiði innan harðskapsfakligheitina í Føroyum, eitt nú við at lógartryggja verandi mannagongdir, tilboð og tænastur hjá Kvinnuhúsinum.

Triðja økið, Átøk, ið venda sær til *yrkisbólkar*, hevur serligt fokus á at fáa ment samstarvið millum geirar, sum hava markamót til harðskapsøkið. Ein týðandi partur er her at fáa ment eitt mál um harðskap, sum ger tað møguligt at seta orð á harðskapin við øllum hansara brigdum.

Fjórða økið, Átøk at lætta um atgongdina til hjálp í sambandi við harðskapin, er grundað á eitt ynski frá nógvum av hoyringarpørtunum, sum vísa á tørvin á at skipa „inngongdina" til harðskapsøkið í eina Hjálparlinju/hotline-skipan við harðskapsfakligum førleika, sum er ætlað bæði harðskapsraktum, teirra avvarðandi, fakfólki og fremjarum.

Fimta økið, Átøk at stuðla vísindaligum kanningararbeiði innan *harðskapsøki*, er nýtt í føroyskum høpi, men er grundað á royndir frá grannalondunum um at raðfesta og menna vísindaliga partin av harðskapsfakligheitini.

## At upplýsa og fyribyrgja harðskapi

Í meira enn 10 ár hevur verið arbeitt við átøkum at upplýsa og kunna um harðskap í Føroyum. Átøkini hava havt til endamáls at fyribyrgja við at seta inn tíðliga fyri at ónda ringrásin við harðskapi verður brotin.

Hoyringarnar hjá arbeiðsbólkinum vísa greitt, at tøgnin framvegis ger seg galdandi á harðskapsøkinum. Serliga tá ið talan er um harðskap í parløgum og nærsambondum. Hóast vit seinastu árini hava flutt okkum nakað fram á leið, eru vit enn á einum byrjanarstigi.

Fyri harðskapsrakt er tað ein afturvendandi avbjóðing at tora at viðurkenna sína støðu. Hóast tey innast inni vita, at tað, sum gongur fyri seg, ikki er rætt, so ivast tey og vóna, at støðan fer at broytast. Óttin og skommin gera tað verri at viðurkenna trupulleikan.

Ein onnur avbjóðing er ofta fíggjarligi parturin, og hvussu tey skulu kunna klára seg víðari í lívinum. At missa sítt sosiala netverk er ein vanlig avleiðing av harðskapinum, sum ger tað uppaftur truplari at gera nakað.

Nevnast skal eisini, at kanningar vísa, at børn, sum hava livað við harðskapi, seinni í lívinum hava lyndi til at fyrigeva, góðtaka og finna seg í harðskapi, og at sannlíkindini økjast fyri, at tey sjálv gerast fremjarar í sínum vaksna lívi. Tí eigur at verða tryggjað, at vit frá barni av verða upplýst um, at harðskapur ongantíð eigur at verða góðtikin.

Nakað, sum eyðkennir harðskapsøkið, er, at tað vísir seg at vera sera trupult hjá myndugleikum, skúlum, felagsskapum og øðrum at varnast, leggja uppí og hjálpa. Hoyringarnar hjá arbeiðsbólkinum vísa, at vit ofta hava tørv á neyðugu orðunum til at kunna taka prátið við tann, ið er fyri harðskapi.

Vit mugu tí staðfesta, at harðskapur í parløgum og nærsambondum framvegis er nakað, ið fer fram

18 https://kvinnuhusid.fo/um-hardskap/hvat-er-hardskapur/

19 Víst verður eisini til tiltakið í Smæruni 25. november 2022, har evnið var „Talgildur harðskapur". Kvinnuhúsið, Kvinnufelagið, Amnesty og Sig frá! skipaðu fyri.

innan fyri teir fýra veggirnar í heiminum, og at okkum vantar eina uppgerð og eitt alment kjak á hesum økinum í Føroyum. Somuleiðis tørvar okkum at finna orðini og fáa skapt eitt mál fyri, hvat harðskapurin er, og hvat hann ger við okkum sum borgarar og sum samfelag. Tá fólk eru tilvitað um, at tað, ið tey hava verið fyri, er skeivt, minka sannlíkindini fyri, at tey venda sjóneykuni inneftir og onkursvegna geva sær sjálvum skyldina. Hetta ger tað minni trupult hjá fólkum at leita sær hjálp og seta orð á tað, ið er hent.

***

Royndirnar, bæði úr Kvinnuhúsinum og úr grannalondunum, hava víst, at stórur partur av teimum, ið eru fyri harðskapi í áravís hava gingið og ivast í, hvat tað í veruleikanum er, sum gongur fyri seg, og at hetta er orsøkin til, at tey ikki hava leitað sær hjálp fyrr.

Her eru upplýsandi átøk neyðug. Við at skipa fyri átaki, har fólk, sum ynskja at vita meira um harðskapsfakliga økið, ella fólk, sum ivast í, um tey, ið eru fyri harðskapi, og/ella avvarðandi, fáa neyðuga innlitið, verður latið upp fyri at bróta hesa tøgnina.

Upplýsingin verður løgd til rættis soleiðis at tosað verður út frá kanningum um harðskap í parlagi og nærsambondum, um stigini at ivast, at varnast harðskapin og vónina um broyting. At viðurkenna trupulleikan og um fyrireikingartíðina at søkja sær hjálp. Um ótta, skomm og fíggjarligar avbjóðingar, sum kunnu forða ella seinka tilgongdini. Og um vantandi sosialt netverk, sum minkar um møguleikarnar fyri, at tú velur at søkja tær hjálp, og um stigmatisering og sjálvstigmatisering.

Samanumtikið skal upplýsingin vera við til at hjálpa teimum harðskapsraktu at seta orð á, hvat harðskapurin er, hvat hann ger við tey, og soleiðis hjálpa teimum fyrstu fetini úr harðskapinum.

## Átak 1

**Upplýsandi átak um harðskapsfakliga økið fyri fólk, sum vilja vita meira um harðskap í parløgum og nærsambondum**

**Endamál:** At skapa opinleika og ein pall til at tosa um harðskap, at fáa innlit í økið og at skunda undir eina hugburðsbroyting á harðskapsøkinum.
**Mettur kostnaður:** 10.000 kr.
**Ábyrgd:** Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Hvørt ár

Tey viðbreknastu í málbólkinum parløg og nærsambond eru børnini. Tey eiga heilt frá ungum árum at fáa upplýsing um, at harðskapur er mannarættindabrot og lógarbrot, og at eingin skal góðtaka eitt lív í harðskapi.

Við at skipa upplýsing sum fyribyrging fyri børnum, skal tann boðskapurin standa teimum greiður, at øll eiga at siga frá, um tey hava verið fyri harðskapi ella vita um harðskap, sum onnur eru fyri. Samstundis eiga tey at verða upplýst um, hvar tey kunnu venda sær í tílíkum førum.

Vit kenna til vandan at børn, sum hava livað við harðskapi, umframt møgulig sálarlig mein, seinni í lívinum fyrigeva, góðtaka og finna seg í harðskapi. Og at tey sjálv fara at fremja harðskap. Børn, sum liva í harðskapi, eiga tí at verða tryggjað stuðul og hjálp, so tey ikki seinni í lívinum gerast partur av harðskapstrupulleikanum. Vit mugu tí bróta tøgnina og hjálpa børnunum at seta orð á støðuna.

Vit hava amboð til at røkka børnunum í stovnsaldri og skúlaaldri, og tí verður mælt til at kjølfesta upplýsingina sum part av hesum skipanum. Samstundis eiga vit at tryggja, at neyðugt tilfar støðugt verður ment til at nýta í hesum arbeiðinum. Málið má vera, at øll børn læra um týdningin av at virða mørk hjá hvørjum øðrum, tí hetta er ein fyritreyt fyri einum fólkaræðisligum samfelagi, og málið er harvið at fáa kjølfest tann hugburð í samfelagið, at harðskapur ongantíð kann góðtakast.

## Átak 2

**Upplýsandi og fyribyrgjandi átøk, ið venda sær til børn**

**Endamál:** At gera børn og ung varug við harðskap og útvega teimum amboð og møguleikar at siga frá, tá tey sjálv ella onnur eru fyri harðskapi.
**Mettur kostnaður:** 75.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, SSP, Barnaverndarstovan/Barnahúsið og Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Annaðhvørt ár

Kanningar vísa, at ung eru ein serliga útsettur bólkur viðvíkjandi harðskapi í parløgum. Harðskapur í parløgum millum ung hevur sítt egna heiti, unnustaharðskapur, ið fevnir um harðskap í parløgum í aldursbólkinum 16 til 24 ár[20]. Ofta er talan um leysari unnustasambond, har partarnir ikki búgva saman, ikki hava felags fíggjarviðurskifti og ikki eiga børn saman.

Netverkini og vinarbondini hjá teimum ungu hava stóra ávirkan á, um tey góðtaka harðskapin ella ei. Tí er tað sera umráðandi, at tey ungu verða upplýst um harðskap, eisini unnustaharðskap, og at tey skilja avleiðingarnar og gerast tilvitað um, at eitt lív við harðskapi ikki kann góðtakast.

Tað er eitt ávíst mynstur, sum eyðkennir unnustaharðskap:

*Fremjarin hevur ikki álit, er mistrúgvin og sjalu og vil tí avbyrgja partnaran frá vinum og familju. Við at hava eftirlit við telefonini, sosialum miðlum og hvørjum vinum, partnarin hittir, verður talan um sálarligan harðskap, ið skjótt kann flyta seg til likamligan harðskap.*

Millum tey ungu, vísir seg eisini sama mynstrið við skuldarkenslu. Tann harðskapsrakti hevur ofta eina fatan av, at viðkomandi sjálv/ur er orsøkin til harðskapin. Henda skommin kann føra til, at tey ungu ikki tora at at siga frá, men fjala harðskapin og halda, at tey kunnu læra seg at liva við honum.

Gransking, bæði í Føroyum[22] og í okkara grannalondum, vísir, at tey ungu ynskja at læra um mørk, og at tað verður tosað um hetta í skúlanum. Og at tað eru tryggir karmar til at siga frá upplivingum, eitt nú frá barndóminum, har tey ungu kunnu hava kent seg svikin. Ella um hvat er vanligt í ungdóminum og at verða mint á at taka ábyrgd fyri sær sjálvum. Samanlagt er talan um, at tey ungu fáa frálæru í atferð í einum fólkaræðisligum samfelag, sum er grundað á eina felags fatan av dannilsi.

Tað er tí umráðandi, at upplýsandi átøk um harðskap venda sær til tey ungu, og tey gerast før fyri at varnast harðskap – eisini tey fyrstu tekinini um unnustaharðskap – og um neyðugt at fara úr tílíkum parløgum. Upplýsing um harðskap er við til at skapa eitt mál fyri trupulleikanum og ger tað tí eisini lættari hjá ungum at leita sær hjálp – bæði hjá

**Talgildur harðskapur:**

”tá eg skuldi í Kvinnuhúsið til samrøðu, mátti eg koyra langan umveg. Eg koyrdi fyrst út á bygd, parkeraði bilin har, og mátti síðani leiga ein taxa at koyra til Havnar. Hetta gjørdist ein dýrur túrur. Men eg hevði onki val, tí maðurin hevur sett gps'ara á bilin og fylgdi sera neyvt við, hvar eg fór um dagarnar”

20 https://danner.dk/vold-og-unge
21 https://danner.dk/vold-og-unge
22 Marin í Dali „Vitan um seksualitet millum ung í Føroyum"

teimum, sum hava verið fyri harðskapi, og teimum, sum hava framt harðskap.

Upplýsandi átakið kann skipast á fleiri pallum og saman við fleiri ymiskum samstarvspørtum. Eitt nú við at framleiða film at brúka bæði á ymiskum miðlum á alnetinum, sum kunning á miðnámsskúlum, til festivalar o.a.

## Átak 3

**Upplýsandi og fyribyrgjandi átøk, ið venda sær til ung**
**Endamál:** At gera tey ungu varug við harðskap og kunna tey um, hvar tey kunnu leita sær hjálp, um tey hava verið fyri unnustaharðskapi ella sjálv hava verið harðlig.
**Mettur kostnaður:** 75.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Annaðhvørt ár

Seinastu 10 árini hevur verið arbeitt miðvíst við at bróta tøgnina um harðskap í parlagi og nærsambondum. Hetta er m.a. gjørt við faldarum, filmum og upplýsandi átøkum, eins og tað hevur verið varpað ljós á harðskapin í miðlunum.

Sama tíðarskeiðið hevur samfelagið eisini ment seg við rúkandi ferð, eitt nú innan sosialar miðlar og aðrar talgildar pallar. Tí er umráðandi, at vit nú seta okkum nýggj mál við nýggjum tilfari um harðskap, sum eisini er ment hesi árini.

Upplýsandi átøkini hava verið ein týðandi partur av fyribyrgjandi arbeiðinum, og vit uppliva eisini, at tað eru harðskapsrakt, sum tora betri at søkja sær hjálp í dag. Men hoyringarnar til hesa heildarætlanina hava samstundis staðfest, at enn er tøgnin ikki brotin.

Tí er neyðugt við áhaldandi arbeiði við upplýsing sum fyribyrging móti harðskapi. Vit mugu sum samfelag tora at nema við harðskapstrupulleikan, at seta orð á og tosa um hann. Tað er tøgnin, ið heldur lív í harðskapinum. Læra vit at tosa um harðskapin, kunnu vit geva harðskapsraktum styrki til at siga frá, til at søkja sær hjálp og til at flyta seg burtur úr harðligum parløgum og nærsambondum.

## Átak 4

**Upplýsandi og fyribyrgjandi átøk, ið venda sær til almenningin**
**Endamál:** Við upplýsing um harðskap at broyta hugburðin í samfelagnum til harðskap í parlagi og nærsambondum. Við at eggja til at tosa um trupulleikan hjálpa vit harðskapsraktum til at tora at viðurkenna hann.
**Mettur kostnaður:** 75.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið og Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Annaðhvørt ár

Seinasta heildarætlanin hevði eitt upplýsandi og fyribyrgjandi átak, ið serliga vendi sær til útlendskar kvinnur við uppihaldsloyvi í Føroyum. Í dag síggja vit ein vøkstur í talinum á tilflytarum til Føroya, og hugsast kann tí, at tørvurin á hesum átakinum sannlíkt er enn størri enn áður. Hetta er somuleiðis ein sannroynd í grannalondunum, har tey gera serligar loysnir fyri at hjálpa útlendskum kvinnum, ið eru í einari serliga viðkvæmari støðu, tá tær eru fyri harðskapi í parlagi. Hesar kvinnurnar hava nevniliga, í nógvum førum, ikki somu sosialu trygdarskipan, sum føroyskar kvinnur vanliga hava. Royndirnar úr Kvinnuhúsinum vísa framvegis, at fleiri av hesum kvinnunum als ikki vita, hvørji rættindi tær hava, og hvørjar myndugleikar tær kunnu seta seg í samband við, um tær eru fyri harðskapi. Tær uppliva, at makin hóttir við, at tær verða sendar av landinum, um tær boða nøkrum frá harðskapinum.

Neyðugt er tí at dagføra tilfarið úr fyrru heildarætlanini og geva tað út av nýggjum. Hetta kann viðvirka til, at hesar kvinnurnar fáa upplýsingar um síni rættindi og um føroyska samfelagsbygnaðin sum heild, og at tær vita, hvagar tær skulu venda sær við ymiskum viðurskiftum, eisini um børnini.

## Átak 5

**Upplýsandi tilfar til tilflytarar skal dagførast**
**Endamál:** At tryggja útlendskum kvinnum upplýsing um síni rættindi, og hvagar tær skulu venda sær fyri at fáa hjálp
**Mettur kostnaður:** 10.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Útlendingastovan, Barnaverndarstovan og Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Annaðhvørt ár



## Likamligur harðskapur:

„hann tók eina grýtu fram og setti vatn á kók. Eg helt, at hann fór at gera mat. Men brádliga tók hann grýtuna og stoytti kókandi vatn á meg. Eg hoknaði niður av pínu. Tá eg hugdi upp, stóð hann har og flenti at mær“

## Átøk sum stuðul til harðskapsrakt

Tilboð um hjálp og stuðul til harðskapsrakt í Føroyum eru støðugt ment og víðkað seinastu 30 árini. Við fyrru heildarætlanini var neyðugt at skipa átøk at veita bráðfeingis stuðul til harðskapsrakt, eitt nú sálarfrøðiliga viðgerð til harðskapsraktar kvinnur og børn, stuðul til mat og neyðsynjarvørur til teirra á Kreppumiðstøðini, tulkingarskipan til útlendskar kvinnur og karmar at skipa fyri samrøðubólkum.

Við støði í hesum átøkum, royndum úr Kvinnuhúsinum og úr okkara grannalondum, hava átøkini í hesi heildarætlanini til endamáls at byggja víðari á hetta arbeiðið og samstundis menna og nýhugsa virksemið. Neyðugt er at víðka virksemið og at gera átøk, ið eisini rúma tilboðum til bæði harðskapsraktar menn og avvarðandi. Eisini er neyðugt at byrja at fyrireika eitt heildartilboð, har eftirvernd fyri harðskapsrakt er hugsað inn heilt frá byrjan av. At enda er eisini neyðugt at styrkja sálarfrøðiviðgerðina til harðskapsrakt børn.

Umframt hesi átøk, sum beinleiðis snúgva seg um stuðul til harðskapsrakt, er eisini neyðugt at gera ymiskar dagføringar av revsilóggávuni og almannalóggávuni, sum hava við harðskap at gera.

***

Við seinastu heildarætlanini kom eitt tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til harðskapsrakt, sum koma á kreppumiðstøðina í Kvinnuhúsinum og til ráðgevingina hjá Kvinnuhúsinum. Upprunaliga var endamálið at veita harðskapsraktum upp til fimm viðtalur av sálarfrøðiligari hjálp fyri at hjálpa teimum at koma fyri seg aftur. Tilboðið hevur verið væleydnað og er eisini stigvíst víðkað hesi seinastu tíggju árini.

Sum nevnt varð í fjør farið undir eitt ambulant tilboð við harðskapsráðgeving, sum eisini er ætlað monnum. Tað sást alt fyri eitt, at tørvur er á hesum, og frá byrjan hava menn eisini leitað sær hjálp í harðskapsmóttøkuni. Verandi tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til harðskapsrakt er bara ætlað kvinnum. Neyðugt er tí at hugsa inn í skipanina, at menn fáa somu atgongd til viðgerðartilboð hjá sálarfrøðingi.

Tá harðskapur rakar, er tað sjálvandi tann ella tey, ið eru beinleiðis fyri harðskapinum, ið eru harðast rakt. Tó vísa kanningar, at avvarðandi somuleiðis verða merkt av og liva við ampa um harðskapin. Talan kann vera um foreldur, systkin, vinfólk ella onnur, ið hava tætt samband við tann harðskapsrakta ella fremjaran. Ambulanta tilboðið við harðskapsráðgeving er eisini ætlað hesum bólkinum. Her fáa tey bjóðað samrøður og vegleiðing um støðuna, og um hvussu farast kann fram. Í onkrum førum er neyðugt við sálarfrøðiligari hjálp, og við átakinum um tilboð um ókeypis viðgerðartilboð verður hetta nú møguligt.

## Átak 6

**Víðka tilboðið um sálarfrøðiviðgerð til harðskapsrakt til aðrar málbólkar**
**Endamál:** At víðka tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til harðskapsrakt, bæði á Kreppumiðstøðini og í Harðskapsmóttøkuni í Kvinnuhúsinum, soleiðis at tilboðið eisini fer at fevna um menn og avvarðandi.
**Mettur kostnaður:** 50.000 kr.
**Ábyrgd:** Harðskapsmóttøkan
**Tíðarætlan:** Hvørt ár

Royndirnar við sjálvhjálparbólkum til harðskapsrakt hevur øll árini síðani seinastu heildarætlanina verið eitt afturvendandi og væleydnað tilboð. Her hava harðskapsraktar kvinnur møguleikan at hitta kvinnur við líknandi trupulleikum. Sjálvhjálparbólkurin gevur tí einstaka luttakaranum høvi til at fortelja um sínar upplivingar, tankar og kenslur fyri øðrum í líknandi støðu. Endamálið við bólkinum er, at luttakararnir stuðla hvørjum øðrum, finna loysnir og á tann hátt veita hjálp til sjálvhjálp.

Luttakararnir eru sjálvir við til at gera av, hvussu arbeiðið í bólkinum skal fara fram, og hvat serligur dentur skal leggjast á. Knýtt at bólkinum eru tvey fakfólk, ið stuðla og leggja bólkinum lag á. Áherðsla verður løgd á tagnarskyldu. Á leið 6 – 8 luttakarar eru í einum bólki.

Við nýggja ambulanta tilboðnum við harðskapsráðgeving, sum eisini er ætlað monnum, verður nú tørvur á eisini at skipa sjálvhjálparbólk til harðskapsraktar menn.

Sama er galdandi fyri avvarðandi hjá harðskapsraktum. Avvarðandi vita ofta ikki, um ella hvussu tey skulu leggja uppí, og eru ofta bangin fyri at missa sambandið við tann harðskapsrakta. Nógv hava longu mist sambandið, tí makin noktar tí harðskapsrakta at hava samband við familju og vinir. Hetta er ein trupulleiki, tí avvarðandi kunnu í nógvum førum stuðla tí harðskapsrakta at søkja sær hjálp.

Útlendskar kvinnur, sum eru fluttar til Føroyar úr fjarskotnum londum, leita sær eisini hjálp vegna harðskap og gista eisini á Kreppumiðstøðini. Hesar kvinnurnar, sum ofta eru í eini serliga truplari støðu, hava í nógvum førum millum lítlar og ongar førleikar at samskifta á føroyskum. Tí verður mælt til, at útlendskar kvinnur skulu fáa í boði at luttaka í sjálvhjálparbólki til harðskapsrakt á enskum máli.

## Átak 7

**Víðka tilboðið um sjálvhjálparbólkar til aðrar málbólkar**

**Endamál:** At víðka tilboðið um sjálvhjálparbólkar, soleiðis at tilboðið eisini fer at fevna um menn, avvarðandi hjá harðskapsraktum og útlendingar, sum ikki hava møguleika at samskifta á føroyskum. Endamálið er at veita hjálp til sjálvhjálp, sum kann vera við til at avmarka langtíðarárin av harðskapinum.

**Mettur kostnaður:** 20.000 kr.

Ábyrgd: Harðskapsmóttøkan

**Tíðarætlan:** Hvørt ár

Neyðugt er at menna tilboð um eftirvernd til harðskapsrakt – í framhaldi av teimum tilboðum, sum í dag standa harðskapsraktum í boði.

Fyri tann harðskapsrakta er skiftið frá at hava verið á Kreppumiðstøð ella at hava fingið ambulanta harðskapsráðgeving til aftur at byrja ein vanligan gerandisdag heima, ein avgerandi tíð, sum kann vera hættislig. Vandi er fyri, at tann harðskapsrakti dettur aftur í sama mynstur við harðskapi, ella at fremjarin aftur fær fastatøkur á viðkomandi. At skula megna alt í gerandisdegnum frá degi til dags kann gerast ein ov stórur biti. Tað er her, at tilboðið um eftirvernd kann vera avgerandi.

Eftirvernd kann t.d. skipast sum eitt netverkskvøld fyri harðskapsrakt, møguliga eisini børn, fyri at stuðla teimum í tilgongdini at sleppa heilt burtur úr harðskapinum.

Royndir eru gjørdar í okkara grannalondum, har arbeitt hevur verið við at menna ætlanir fyri hesum tilboði, eins og verkætlanir hava verið framdar[23], men í Føroyum hava vit í dag einki tilboð um eftirvernd til harðskapsrakt. Mælt verður tí til at seta hol á tilgongdina at menna eitt tílíkt tilboð. Ein fyritreyt fyri hesum er, at tey, ið arbeiða innan harðskapsfakligheitina í Føroyum, fáa møguleika at førleikamenna seg innan júst hetta økið.

## Átak 8

**At menna eitt tilboð um eftirvernd til harðskapsrakt**

**Endamál:** At hjálpa og stuðla teimum, ið hava verið fyri harðskapi, at sleppa heilt burtur úr harðskapinum, soleiðis at tey ikki detta aftur í gomul mynstur.

**Mettur kostnaður:** 50.000 kr.

**Ábyrgd:** Harðskapsmóttøkan

**Tíðarætlan:** Hvørt ár

23 https://levudenvold.dk/media/jhtfk5yp/rapport_efterv%C3%A6rn_levudenvold.pdf



Barnahúsið, sum varð skipað í framhaldi av átaki 10 í fyrru heildarætlanini, hevur virkað í skjótt 10 ár. Málið var tá at skipa viðgerðartilboð til børn, sum hava verið fyri harðskapi ella hava verið vitni til harðskap, við tí fyri eyga at børnini fóta sær, og at langtíðarárin av harðskapinum verða avmarkað.

Barnahúsið, sum hugsjónarliga tekur støði í norðurlendska barnahúsleistinum, er grundað á samstarv tvørtur um kommunur og fakmørk. Felags serkunnleikin í samstarvinum skal tryggja, at arbeiðið við einstaka barninum verður gjørt við støði í eini heildarmynd.

Endamálið er, at hvørt einstakt mál verður avgreitt soleiðis, at mest møguligt fyrilit verður tikið fyri barninum. Barnahúsið skal tryggja, at viðgerðin er so varislig sum gjørligt, tá ágangurin verður kannaður nærri. Arbeiðið tekur støði í eini barnavinarligari heildarfatan, sum fyrst og fremst savnar seg um tann einstaka, ið hevur verið fyri ágangi.

Barnahúsið hevur hesi árini gjørt sær nógvar royndir, eins og tey fylgja væl við royndunum hjá øðrum barnahúsum, sum Barnahúsið samstarvar við í grannalondum. Bæði í okkara hoyring við Barnahúsið og í Ársfrágreiðing teirra fyri 2022[24] hava tey víst á ítøkilig tilmælir um dagføring av tilboðnum hjá Barnahúsinum, sum øll onkursvegna snúgva seg um harðskap.

Børn eru partur av nógv teimum flestu harðskapsmálunum. Hóast tey ikki altíð sjálv eru rakt av likamliga partinum av harðskapinum, so eru tey, sum vitni og partur av familjuni, sera hart rakt av eitt nú sálarligum harðskapi[25]. Tí er neyðugt at raðfesta eina størri játtan til viðgerðartilboð við sálarfrøðiligari hjálp til harðskapsrakt børn. Bæði fyri at stuðla og hjálpa teimum í støðuni við harðskapi og sum fyribyrging móti framtíðar avleiðingum av harðskapinum. Barnahúsið kann veita harðskapsraktum børnum eitt nútíðarhóskandi og dygdargott tilboð.

## Átak 9

**Sálarfrøðviðgerð til harðskapsrakt børn**

**Endamál:** At veita sálarfrøðiligt viðgerðartilboð til harðskapsrakt børn, íroknað børn, sum flyta á Kreppumiðstøðina saman við mammuni. Endamálið við hesum er at hjálpa børnunum í støðuni við harðskapi og at fyribyrgja langtíðarárin av harðskapinum.

**Mettur kostnaður:** 150.000 kr.

**Ábyrgd:** Barnahúsið

**Tíðarætlan:** Hvørt ár

Seinastu árini eru vit vorðin alsamt meira tilvitað um sálarligan harðskap sum eitt sjálvstøðugt fyribrigdi. Sálarligur harðskapur er kanska tað slagi av harðskapi, sum fyllir mest í almenna kjakinum í dag. Kanningar vísa eisini, at sálarligur harðskapur kann vera minst líka skaðandi sum likamligur harðskapur.

Sálarligur harðskapur er, tá ein persónur meira enn eina ferð niðrar, eyðmýkir, villeiðir, hóttir, avbyrgir ella roynir at stýra einum øðrum persóni. Harðskapurin liggur í endurtøkuni, sum hevur við sær, at sjálvsvirðið hjá tí óræettaða verður brotið niður. Endamálið við sálarliga harðskapinum er at stýra ella avmarka lívsførsluna hjá tí órættaða, tó at hetta ikki altíð er eins tilætlað frá fremjarans síðu.[26]

Í nógvum førum endar tað við, at ofrið fær varandi mein av sálarliga harðskapinum. Hetta vísir seg serliga ofta hjá persónum, ið hava verið fyri sálarligum harðskapi í einum parlagi ella gjøgnum annað nærsamband. Tá sæst tað ofta, at negativu avleiðingarnar gera um seg, eisini eftir at sálarligi harðskapurin er steðgaður, eitt nú tí at samlívið er hildið uppat. Tað er heldur ikki óvanligt, at offur fyri sálarligum harðskapi mugu stríðast við avleiðingarnar restina av lívinum.

Føroyska revsilógin kriminaliserar í dag ymisk sløg av gerðum, sum gera seg inn á sálarliga sjálvræðisrættin, og sum harvið koma undir sálarligan harðskap. Sambært § 266 í revsilógini eru ávísar hóttanir t.d. ólógligar. Nevnast kunnu eisini § 260 í revsilógini um ólógligan tvingsil og § 245, stk. 2, ið

24 file:///C:/Users/ln18522/Downloads/Barnahusid-2022-ENDALIG%20(2).pdf

25 https://levudenvold.dk/viden-om-vold/publikationer/rapport-vold-i-barndommen-voksne-danskeres-erfaringer-med-vold-i-barndomshjemmet/

26 https://danner.dk/psykisk-vold

## Tráelting:

”tá eg var farin frá manninum, versnaði støðan enn meira. Hann byrjaði at forfylgja mær, skrivaði og ringdi konstant, hótti meg við, at eg fór at missa børnini o.s.fr. Ein dagin, tá eg fekk frí frá arbeiði, vóru yvir 60 ’ubesvaret’ uppkall á telefonini, og nógv ljót boð. Eg var so illa fyri, ristist av maktarsloysi. Komin út á parkeringsplássið stóð hann brádliga har og skeldaði meg út. Eg visti ongantíð, hvat hann kundi finna uppá“

m.a. fevnir um støður, har harðskapurin hevur havt við sær sálarligt mein.

Tað er tó ein røð av gerðum, sum koma undir yvirskipaðu skilgreiningina av sálarligum harðskapi omanfyri, sum fella uttanfyri hesar ásetingarnar, og sum harvið ikki eru revsiverdar í dag. T.d. gerðir, sum møguliga eru til stóran ampa fyri tann, ið tær verða framdar ímóti, men sum ikki eru nóg álvarsamar til at koma undir § 266 um hóttanir ella § 260 um ólógligan tvingsil.

Føroyska revsilógin hevur við øðrum orðum onga áseting, sum kriminaliserar sálarligan harðskap í sær sjálvum.

Ein serlig grein av sálarligum harðskapi, sum eigur at verða nevnd fyri seg, er tráfylging, eisini kent sum stalking. Tráfylging er, tá ein persónur áhaldandi og á ein skipaðan hátt setur seg í samband við ella eltir ein persón, sum ikki vil hava samband við viðkomandi. Tráfylging kann, eins og annar sálarligur harðskapur, vera sera skaðandi fyri tann tráfylgda.[27]

Føroyska revsilógin hevur í dag heldur onga áseting, sum kriminaliserar tráfylging í sær sjálvum.[28]

Í Danmark vórðu ásetingar um sálarligan harðskap og tráfylging settar inn í revsilógina í ávikavist 2019 og 2022. Hetta varð m.a. gjørt fyri at fáa donsku revsilógina í samsvar við Istanbul-sáttmálan um at fyribyrgja og basa harðskapi móti kvinnum og harðskap í nærsambondum, sum Danmark samtykti í 2013[29], men sum Føroyar ikki hava samtykt enn.

Verandi rættarstøða er óskynsom, tí hon samsvarar ikki við tær harðskapsfakligu royndirnar og vitanina, vit gjøgnum seinastu góðu 30 árini hava bygt upp í Føroyum – fremst av øllum gjøgnum Kvinnuhúsið. Í dag vita vit nevniliga, at sálarligur harðskapur og likamligur harðskapur hanga saman, og at sálarligur harðskapur í sær sjálvum kann vera minst líka oyðileggjandi sum likamligur harðskapur.

Vit vita eisini, at likamligur harðskapur næstan altíð byrjar sum sálarligur harðskapur, og at sálarligi harðskapurin kann ganga fyri seg í nógv ár, áðrenn hann eisini byrjar at fata um likamligan harðskap. Sálarligur harðskapur er sostatt ofta ein fyriboðan um likamligan harðskap, og við at kriminalisera sálarligan harðskap er tað hugsandi, at vit eisini kunnu fyribyrgja likamligan harðskap.

Royndirnar hjá Kvinnuhúsinum eru, at tá harð-

27 https://danskstalkingcenter.dk/hvad-er-stalking/

28 Løgtingslóg um frástøðuboð hevur verið í gildi í Føroyum síðani 2017. Brot á frástøðuboð kunnu sambært § 21, stk. 1, í løgtingslógini revsast við sekt ella fongsli í upp til 2 ár. Løgtingslógin fevnir tó bara um støður, har persónurin frammanundan hevur fingið eini frástøðuboð. Nevnast kann í hesum sambandi, at tráfylging ofta kann vera av tílíkum slagi, har tann óræ ttaði ikki veit, hvør tráfylgjarin er.

29 https://www.coe.int/en/web/istanbul-convention/denmark



## Sálarligur harðskapur:

„eg føldi tað, sum at hann bukaði meg hvønn dag, ikki við nevunum, men við orðum og atburði. Hørðu orðini vóru sum hvassir knívar. Niðurgerðingarnar sum hamarsløg. Sárini og blóðið sást ikki uttaná, men innaní vóru djúp sár. Enn eru nógv blá merki og stór arr, sum ikki síggjast, men kortini følast. Pínan setur síni spor enn í dag. Arrini fara helst ongantíð heilt vekk“

skapsrakt venda sær til ambulantu ráðgevingina fyri fyrstu ferð, er tað næstan altíð soleiðis, at tey at byrja við siga seg ivast í, um tað, sum tey uppliva heima við hús, veruliga er harðskapur. Tá vísir tað seg ofta, at persónurin hevur verið fyri sálarligum harðskapi í nógv ár uttan at hava verið fyri tí stóra likamliga harðskapinum, og at viðkomandi tí ikki hevur tikið stig til at koma burtur úr støðuni fyrr enn nú.

Við at javnseta sálarligan harðskap við likamligan harðskap sleppa vit undan nógvum av hesum ivamálunum. Kriminalisering er ein greið samfelagslig staðfesting av, at gerðir, sum koma undir sálarligan harðskap og tráfylging, ikki á nakran hátt verða góðtiknar. Hetta signalið kann viðvirka til, at fólk heilt frá ungum árum gerast meira tilvitað um, hvat sálarligur harðskapur er, og at tey, sum eru fyri hesum slagi av harðskapi, skjótari sleppa sær burtur úr støðuni.

### Átak 10

**At kriminalisera sálarligan harðskap og tráfylging**

**Endamál:** At javnseta sálarligan harðskap við likamligan harðskap og at kriminalisera tráfylging. Hetta kann m.a. hava við sær, at persónar, ið eru fyri sálarligum harðskapi og tráfylging, skjótari søkja sær hjálp ella sjálvir taka stig til at koma burtur úr støðuni.

**Mettur kostnaður:** 0 kr.

**Ábyrgd:** Løgmálaráðið

**Tíðarætlan:** 2025

Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ásetur í § 44, stk. 1, at persónar, ið eru fyri harðskapi í parlagi ella í øðrum nærsambondum, hava rætt til fyribils gisting, umframt umsorgan, ráð og vegleiðing.

Stk. 2-3 áseta, at kreppumiðstøðin tekur avgerð um innskriving, og at persónurin, ið gistir á kreppumiðstøðini, sjálvur rindar fyri uppihaldið.

Stk. 4 ásetur m.a., at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um kreppumiðstøðir, men tílíkar reglur eru ikki ásettar í dag.

Í viðmerkingunum til § 44 verður sagt, at ásetingin fevnir um bæði kvinnur og menn, ið hava tørv á hjálp vegna harðskap, men at higartil er kreppumiðstøð bara skipað fyri kvinnur og børn í Kvinnuhúsinum í Havn.

Viðmerkingarnar til ásetingina lýsa eisini í ávísan mun tað virksemið og tey tilboð, sum Kvinnuhúsið bjóðar, her ímillum ráðgeving, vegleiðing, samrøður og sálarfrøðiligar viðtalur til persónar, sum hava verið fyri harðskapi í parlagi ella nærsambondum, umframt bólkasamrøður, ið hava til endamáls at veita hjálp til sjálvhjálp.

Danska lov om social service § 109[30] ásetur reglurnar fyri kreppumiðstøðir í Danmark. Greinin kann tí sigast at svara til § 44 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Men har føroyska greinin er sera

30 https://www.retsinformation.dk/eli/lta/2022/170

yvirskipað, lýsir danska greinin meira ítøkiliga tey tilboð og tænastur, ið tú sum harðskapsraktur hevur rætt til.

Sum dømi kann nevnast, at § 109, stk. 9, í servicelógini ásetur, at kvinnur, sum fáa tilboð um bústað á einari kreppumiðstøð, hava rætt til 10 tímar av viðgerð hjá einum løggildum sálarfrøðingi. Til samanberingar ásetur § 44, stk. 1, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, at tú sum harðskapsraktur hevur rætt til „umsorgan, ráð og vegleiðing".

Á sama hátt er servicelógin nógv nágreiniligari enn tann føroyska um, hvussu visiteringin á kreppumiðstøðunum skal fara fram, hvørjum myndugleikum (tað) skal boðast frá hvørjar upplýsingar skulu skrásetast o.s.fr.

Týdningurin av hesum er, at tilboð, tænastur og mannagongdir eru lógartryggjað í Danmark – eins og í hinum grannalondunum – meðan tey ikki eru tað í Føroyum. Í Danmark hevur tú sostatt ein lógartryggjaðan rætt til 10 tímar av sálarfrøðiligari viðgerð, meðan tú ikki hevur sama rætt í Føroyum. Hetta kann hava stóran týdning, eitt nú um stuðulin til Kvinnuhúsið á fíggjarlógini verður skerdur.

### Átak 11

**At lógartryggja tilboð og tænastur til harðskapsrakt**
**Endamál:** At kjølfesta virksemið hjá Kvinnuhúsinum og harvið eisini harðskapsfakligheitina í Føroyum, og at geva harðskapsraktum ein lógartryggjaðan rætt til tey tilboð og tænastur, sum í dag standa teimum í boði.
**Mettur kostnaður:** 0 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið
**Tíðarætlan:** 2024

## Átøk, ið venda sær til yrkisbólkar

Í sambandi við fyrru heildarætlanina kom fram, at yrkisbólkar halda, at samstarvið og samskiftið millum yrkisbólkarnar, sum hava markamót til harðskapsøkið, ikki virkar nóg væl. Tað sama hava okkara hoyringar víst á. Yrkisbólkar vísa í hesum sambandi enn eina ferð á tøgnina, ið er um harðskapin.

Tí er neyðugt at seta nýggj átøk í verk fyri at fáa styrkt samstarvið. Arbeiðsbólkurin hevur valt at raðfesta fakøkir, sum beinleiðis virka í hesum markamóti. Her hava vit samstundis tikið við tilmælir um átøk frá øðrum heildarætlanum, ið eru samanfallandi við tey tilmælir, ið vit vísa á. Heldur enn at gera tað sama arbeiðið umaftur, velja vit at vísa á, hvussu harðskapsfakliga økið eigur at verða hugsað inn í ymiskt arbeiði, sum frammanundan er gjørt á øðrum økjum.

Heildarætlanin setur sjóneykuna á føroysku útbúgvingarnar sum lærari, námsfrøðingur, námsfrøðihjálpari, sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari og heilsuhjálpari og fakøkini, ið virkað sum partur av myndugleikum, stovnum og felagsskapum, ið hava markamót til harðskapsøkið.

Við at gera harðskapsfakligheitina til part av omanfyri nevndu útbúgvingum tryggja vit, at fakfólkini frameftir fáa neyðuga innlitið í harðskapsøkið, og at tey verða skúlað at taka ábyrgd.

Skipast skal eisini fyri undirvísing fyri fakfólkum, so at samstarvið tvørtur um geirar og markamót verður styrkt. Átak um at skipa fyri verkstovu fyri avvarðandi fakbólkum letur upp fyri neyðugu samrøðuni og arbeiðinum við mannagongdum fyri økið.

Neyðugt er somuleiðis at fáa ment og føroyskað tilfar til dagstovnar, fólkaskúla og ungdómsútbúgvingar, og hetta verður best gjørt í einum samstarvi millum harðskapsfakligheitina og Nám.

***

Í sambandi við hoyringarnar varð dentur lagdur á at fáa tær fakútbúgvingar við, sum verða bodnar út í Føroyum, og sum hava eitt markamót til harðskapin. Her var talan um útbúgvingarnar sum lærari, námsfrøðingur, námsfrøðihjálpari, sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari og heilsuhjálpari.

Málið var at hoyra tey um teirra virkisøkið, um royndir teirra við harðskapi í parløgum og nærsambondum sum part av arbeiðinum, og um hvørja undirvísing fakfólkini í dag fáa um harðskap sum lið í útbúgving síni.

Tey, ið skipa fyri útbúgvingunum, eru samd um, at undirvísingin í harðskapi og harðskapsdynamikkum ikki er nøktandi í dag. Skulu tey sum fakfólk læra at varnast harðskapin og veita hjálp og stuðul til harðskapsrakt, má harðskapsfakligheitin gerast størri partur av útbúgvingunum.

Tí var gott at síggja, hvussu tey, ið luttóku til hoyringarnar vegna útbúgvingarnar, tóku væl ímóti hesum og nærum beinanvegin dugdu at fáa eyga á, hvussu harðskapsfakligheitin kann fléttast inn í útbúgvingarnar.

Við støði í hesum verður tí tikið stig til hetta átakið, har lagt verður upp til samstarv millum harðskapsfakliga førleikan og viðkomandi útbúgvingarnar. Undirvísingartilfar er tøkt í okkara grannalondum, og er avtala gjørd um samstarv til at fáa hetta lagað til føroysk viðurskifti[31].

### Átak 12

**Eitt samstarv við avvarðandi útbúgvingarstovnar um at fáa harðskapsfakligheit inn í útbúgvingarnar til: lærara, námsfrøðing, námsfrøðihjálpara, heilsurøktara, heilsuhjálpara og sjúkrarøktarfrøðing.**
**Endamál:** Sum part av útbúgvingunum at tryggja, at fakfólk fáa førleika innan harðskap og harðskapsdynamikkir, læra uppsporandi arbeiði, at síggja harðskapin og at kunna veita hjálp og stuðul til harðskapsrakt.
**Mettur kostnaður:** 30.000 kr.
**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Kvinnuhúsið, Fróðskaparsetur Føroya, Heilsuskúli Føroya
**Tíðarætlan:** 2024-25

## Kynsligur harðskapur:

> ”eg hevði stákast til barnaføðingardag. Børnini vóru so spent. Hann lá á sofuni allan dagin. Stutt áðrenn gestirnir skuldu koma, reisti hann seg upp. Hann kravdi, at eg skuldi koma við honum inn í kamarið her og nú, ella fór hann út. Hvat skuldi eg gera? Eg vildi ikki, at børnini skuldu blíva skuffaði, so eg fór við honum. Hann legði seg á meg, meðan eg lá har og græt. Løtu seinni fór hann út og tók ímóti gestunum, sum um onki var hent“

Aftrat føstu starvsfólkunum arbeiða 35 kvinnur í dag sum sjálvbodnar í Kvinnuhúsinum. Hesar kvinnurnar eru skipaðar í eina vaktarskipan, har tær átaka sær vakt frá kl. 17 gerandisdagar til næsta morgun og alt vikuskiftið. Tað er henda skipanin, sum ger tað møguligt hjá harðskapsraktum kvinnum at venda sær til Kreppumiðstøðina alt samdøgrið.

Arbeiðið í Kvinnuhúsinum er grundað á hjálp til sjálvhjálp. Fyrsta sambandið fáa tey við at ringja fyri at leita sær hjálp og vegleiðing í harðskapsstøðuni, og er hetta sambandið sera avgerandi í allar mátar. Vit vita, at harðskapsrakt ofta útseta at søkja sær hjálp vegna iva, vón um at makin fer at broyta seg, skomm, ótta, og vantandi álit á bæði leik og lærd. Tí hevur tað stóran týdning, hvussu tey verða møtt.

Arbeiðið at skipa fyri undirvísing til sjálvbodnar vaktir í Kvinnuhúsinum er partvíst byrjað, men tørvur er á at menna hetta og at tryggja, at undirvísing verður bjóðað, so hvørt sum nýggj átaka sær sjálvbodnar vaktir.

Sjálvboðin mugu fáa betri innlit í harðskapsfakliga

31 Avtalan er gjørd við ”Lev Uden vold“ í Danmark

vitan, um dynamikkir og prosessir, um at søkja sær hjálp, umframt størri innlit í hjálparmøguleikarnar í samfelagnum. Hetta fer at tryggja ein betri stuðul til tey harðskapsraktu.

Undirvísingin kann verða skipað sum miðvís undirvísing tvey vikuskifti um árið ella sum styttri undirvísing um kvøldið. Undirvísingin skal bæði verða ætlað nýggjum sjálvbodnum og royndum sjálvbodnum, ið skulu dagføra sína vitan um fakið.

### Átak 13

**At skipa fyri undirvísing til sjálvbodnar vaktir í Kvinnuhúsinum**

**Endamál:** At tryggja, at tey, ið átaka sær sjálvbodnar vaktir í Kvinnuhúsinum, verða undirvíst í og fáa neyðuga innlitið í harðskapsfakliga økið.

**Mettur kostnaður:** 15.000 kr.

**Ábyrgd:** Kvinnuhúsið

**Tíðarætlan:** Hvørt ár

Sum áður nevnt, vilja vit við hesi heildarætlanini stuðla undir, at málið fyri harðskap verður ment, soleiðis at tað verður minni trupult at seta orð á harðskapin. Hetta er eisini lýst omanfyri í átaki 12, sum eru føroysku útbúgvingarnar við markamótið til harðskapsøkið.

Sama er sjálvandi eisini galdandi fyri teir myndugleikar, stovnar og felagsskapir, ið virka í markamótinum til harðskapsøkið. Og aftur her var endamálið at hoyra um teirra virkisøki, um teirra royndir við harðskapi í parløgum og nærsambondum sum part av arbeiðinum, og um hvussu tey eiga at handfara vitanina um harðskapin.

Her gekk útsøgnin um eina larmandi tøgn aftur. Í prátinum gekk eisini aftur, at tá børn eru partar av harðskapi í parløgum og nærsambondum, so ger herda fráboðanarskyldan, at tey reagera. Tó hava tey ikki nakrar mannagongdir fyri, hvussu tey fyrihalda seg til harðskap. Eisini vísa tey til, at skrásetingarskipanirnar ikki rúma at skráseta harðskapin, tá tey halda seg hava ein illgruna. Tí ivast tey í, hvussu tey skulu fara fram, og oftast verður hetta bara tagt burtur. Í stuttum kann hetta grundgevast við, at tey ikki eru skúlað í at handfara støðuna.

Markamótið rúmar einum sera breiðum skara av fakfólki[32], ið arbeiðir við sera ymiskum menniskjum, í ymiskum aldri, á sera ymiskum førleikastøði og við sera ymiskum avbjóðingum.

Tørvur er á at fáa skipað upplýsing og kunning um harðskap og harðskapsdynamikkir fyri hesum fakbólkum. Við støði í harðskapsfakligari vitan má arbeiðast fram ímóti, at hesir fakbólkar læra at brúka sama „mál" um harðskapsfaklig viðurskifti. Hetta fyri at fakfólk skulu kunna skilja hvørt annað og kunnu standa saman um at veita hjálp og stuðul til harðskapsrakt.

Hetta má skipast í skeiðum, sum verða hildin regluliga. Hugsast má bæði um at læra nýggj starvsfólk upp og at hava styttri skeið, sum dagføra vitanina. Eisini má leggjast upp fyri at tað á teimum størru plássunum er eitt størri starvsfólkaskifti, ikki minst á dagstovnaøkinum, og at tað tí má vera títtari millum skeiðini.

### Átak 14

**At skipa fyri undirvísing fyri stovnum, felagsskapum og myndugleikum um harðskap og markamót**

**Endamál:** Við støði í harðskapsfakligari vitan at skipa skeið um harðskap og harðskapsdynamikkir við tí endamáli at læra at brúka sama „mál" um harðskapsfaklig viðurskifti. Hetta fyri at fakfólk skulu kunna skilja hvørt annað og kunna standa saman um at veita hjálp og stuðul til harðskapsrakt.

**Mettur kostnaður:** 30.000 kr.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Kvinnuhúsið

**Tíðarætlan:** Hvørt ár

Sum áður nevnt hava hoyringarnar hjá arbeiðsbólkinum víst, at tað eru avbjóðingar við samstarvi millum fakbólkar og stovnar, ið hava við harðskapsøkið at gera.

32 Talan er um starvsfólk í Almannaverkinum, sosialráðgevar o.o. og tey á stovunum við fólki við m.a. menningartarni og sálarsjúku. Viðgerðarheim, ung við rúsevnistrupuleikum og tey heimleysu. Kommunalir stovnar innan barna- og ungdómsøkið, t.d. vøggustovur, barnagarðar, frítíðarskúlar, og innan eldraøkið. Sjúkrahúsverkið, kommunulæknar, tannlæknar, Gigni og ljósmøður, løgreglan og tey, sum varða av tilflytarum.



## Fíggjarligur harðskapur:

„hann syrgdi altíð fyri, at vit brúktu mína løn fyrst. Eg hevði ongan møguleika. Tað var trupult at taka stigið at fara við ongum pengum. Alt kostar. Tú kanst onki gera uttan pengar"

Eitt afturvendandi evni hevur í hesum sambandi verið, at lógarásetta tagnarskyldan verður sæð sum ein forðing fyri samstarvi og samskipan tvørtur um myndugleikar. Yrkisfólk siga seg ivast í, um ella nær tey kunnu lata upplýsingar víðari til aðrar yrkisbólkar og myndugleikar. Í hvønn mun kunnu ein lærari og ein heilsusjúkrasystir tosa saman um ein næming? Og kann ein jarðarmóðir lata upplýsingar víðari til Gigni, um hon hevur illgruna um harðskap?

Heildarætlanin fyri harðskap í parlagi og nærsambondum frá 2011 vísir á sama trupulleika, og tað sama ger Rúsevnisheildarætlanin frá 2022.

Yrkisfólk hava sostatt gjøgnum nógv ár sagt seg ivast í, hvussu lógarásetta tagnarskyldan skal skiljast. Ein vandi við hesum er, at yrkisfólk yvirtulka tagnarskylduna og ikki lata upplýsingar víðari, sum kunnu ella møguliga eiga at verða latnar víðari. Fakfólk uppliva av somu orsøk, at tey ikki fáa neyðuga kunning, um eitthvørt er áfatt.

Í hesum sambandi skal nevnast, at bæði fyrisitingarlógin og dátuverndarlógin eftir umstøðunum loyva (ella áleggja), at ávísar upplýsingar verða latnar víðari. Bæði arbeiðsbólkurin frá 2011 (harðskapur) og arbeiðsbólkurin frá 2022 (rúsevnir) mæla til at gera eina vegleiðing til yrkisfólk um tagnarskylduna, og hesum tekur arbeiðsbólkurin undir við.

Her skal nevnast, at í 2022 var bóklingurin „Børn hava rætt til eitt gott lív"[33] givin út. Bóklingurin er gjørdur í samstarvi millum Barnaverndarstovuna og Sig frá, og er ein vegleiðing til fakfólk um fráboðanarskylduna.

Fakfólk vísa eisini á, at um tey møta einum persóni, ið hevur verið fyri harðskapi, so er einki stað at skráseta harðskapin. Uttan skráseting ber illa til hjá fakfólki at meta um, um støðan er batnað ella versnað, um tann harðskapsrakti kemur aftur, og tað ber ikki til at leita fram og fáa hagtøl um, hvussu støðan er við harðskapi.

Hoyringarnar hava eisini víst, at um tað verður staðfest ella illgruni er um, at ein persónur, ið tey sita yvirav, hevur verið fyri harðskapi, so vita tey ikki nóg væl, hvussu tey skulu spyrja inn til ella handfara tað. Tey meta seg ikki hava neyðugar førleikar og kunnleika til at seta hol á samrøðuna og vita ikki, hvat tey eiga at gera við tað, og hvønn tey eiga at venda sær til.

Av tí at tað eru ivamál um tagnarskylduna, at eingin nøktandi skipan er at skráseta í, og ongar fastar mannagongdir eru fyri, hvussu upplýsingar verða latnar víðari, verða týðandi upplýsingar ikki latnar víðari, tá ið tað er viðkomandi. Vantandi samstarv og vantandi vitanarbýti millum avvarðandi myndugleikar ger tað sera trupult at handfara harðskapsmál og at veita hjálp til harðskapsrakt. Tí er neyðugt við einum átaki, ið gevur fakfólki, ið hava eitt markamót til harðskapsøkið, høvi at hittast og viðgera tær avbjóðingarnar, sum eru við samstarvinum.

Tað verður tí mælt til at skipa fyri verkstovum, har markamót og avbjóðingar við samstarvi verða gjølla viðgjørd. Fyri at tryggja, at tað arbeiðið og tey kjak, ið verða viðgjørd á verkstovunum, ikki verða gloymd, tá ið verkstovan er liðug, verður mælt til, at skrivligt tilfar kemur burtur úr verkstovunum. Her

33 http://www.bvs.fo/barnaverndarstovan/frabo%C3%B0anarskylda

kundi t.d. verið talan um mannagongdir fyri, hvussu upplýsingar um harðskap verða latnar víðari til aðrar fakbólkar. Átakið skal tryggja, at tær skipanir, ið harðskapsrakt børn og vaksin koma í samband við, samstarva, so tann harðskapsrakti verður loftaður beinanvegin.

## Átak 15

**Við verkstovum at styrkja samstarv yvir um geirar og markamót**
**Endamál:** At fakbólkar á eini verkstovu fáa høvi at viðgera samstarvið við aðrar fakbólkar, so tað frameftir verður lættari at samstarva – eisini tvørtur um geirar og fakøki – og at fakfólk vita nær, og hvussu tey geva upplýsingar av týdningi víðari til onnur fakfólk, til gagns fyri tann harðskapsrakta.
**Mettur kostnaður:** 100.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Løgmálaráðið, Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** 2023

Tað er av alstórum týdningi, at okkara børn og ungu so tíðliga sum møguligt fáa vitan um, hvat harðskapur er, at tey fáa ment sín førleika at varnast harðskap, og at tey læra at seta mørk og siga frá, tá harðskapur verður framdur.

Undir hoyringunum er tað fleiri ferðir nevnt, hvussu týdningarmikið tað er, at tað so tíðliga sum møguligt verður byrjað at arbeiða fyribyrgjandi við harðskapi. Í hesum sambandi er tað sera umráðandi, at vit á okkara dagstovnum og fólkaskúlum arbeiða við at upplýsa, kunna og undirvísa okkara børnum um harðskap í parløgum og nærsambondum. Til er tørvur á føroyskum undirvísingartilfari, sum kann nýtast í føroyska fólkaskúlanum, umframt upplýsandi tilfar, sum starvsfólk á dagstovnaøkinum kunnu nýta.

Tí er umráðandi at fáa framleitt námsfrøðiligt tilfar til endamálið, og ætlanin er, at Nám skal framleiða hetta tilfarið. Tað hevur somuleiðis stóran týdning at fáa ment føroyskt tilfar um harðskap, sum tekur støði í dygdargóðari harðskapsfakligheit. Fyri at tryggja, at tilfarið hevur harðskapsfakliga góðsku, má tilfarið tískil gerast í samráð við Kvinnuhúsið, sum hevur størsta yrkisførleikan innan harðskapsøkið í Føroyum.

Umframt undirvísingartilfar til okkara børn og ungu á dagstovnum og skúlum, verða eftir ætlan eisini framleiddar vegleiðingar til fakfólk og lærara-vegleiðingar til lærararnar, har starvsfólk og lærarar fáa amboð, hugskot og vegleiðingar til, hvussu undirvísingartilfarið kann nýtast. Málið er eisini at fáa framleitt talgilt tilfar.

## Átak 16

**Framleiðsla av tilfari í samstarvi við Nám**
**Endamál:** At fáa framleitt harðskapsfakligt undirvísingartilfar á føroyskum, sum skal nýtast á dagstovnaøkinum og fólkaskúlaøkinum í arbeiðinum at fyribyrgja harðskap í familjum og nærsambondum.
**Mettur kostnaður:** 50.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Nám, Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Hvørt ár

## Átøk at lætta um atgongdina til hjálp í sambandi við harðskapin

Í hoyringunum varð tað, næstan uttan undantak, víst á tørvin at skipa soleiðis fyri, at tað frameftir verður eitt stað at venda sær, tá tørvur er á at søkja sær hjálp og vitan um harðskap.

Fakfólk, bæði myndugleikar, skúlar, felagsskapir og onnur, hava torført at siga frá og við at hjálpa. Tey vísa á støður, har tey hava verið í iva ella hava verið bangin um, at harðskapur møguliga hevur verið partur av einum máli, sum tey hava havt ábyrgdina av. Tey sakna at hava eitt stað at kunna venda sær og fáa vegleiðing til at kunna taka støðu út frá.

Tá talan er um støður við børnum, eru tey flestu vitandi um fráboðanarskylduna[34]. Men hóast hetta vilja tey tosa við ein harðskapsfakligan fyri at fáa staðfest, um ivin er grundaður ella ikki.

34 Tíverri vísa hoyringarnar eisini, at tað eru tey fæstu, sum hugsa um fráboðanarskyldu, tá talan er um harðskap millum vaksin í parløgum og nærsambondum, tí tey síggja tað tá sum eitt mál millum tvey vaksin fólk. Her er neyðugt at gera vart við vandan av bara at lata standa til og ikki at gera nakað við støðuna. Harðskapur er ólógligur og eigur altíð at verða steðgaður.



Somuleiðis eru tað avvarðandi, tað kunnu vera bæði foreldur, systkin ella onnur í familjuni, eins og vinir og starvsfelagar, sum eru stúrin um møguligan harðskap og tí vilja søkja sær hjálp og nærri vitan um støðuna.

Vit eiga tí at tryggja, at møguleiki er fyri á ein lættan hátt at søkja sær nærri vitan um harðskap og ráðgeving um støðuna. Ein dulnevnd hjálparlinja/hotline, har øll kunnu venda sær við sínum spurningum um harðskap, kann gera, at fólk í størri mun fara at tora at taka neyðugu stigini til at stuðla og hjálpa og til at leggja uppí.

Hóast vit vita, at harðskapur er ein partur av okkara gerandisdegi, vita vit eisini, at talan er um eitt øki, har tøgnin valdar. Tí tað er ongin, sum reypar sær av at vera partur av harðskapi. Tað at viðurkenna harðskapin er alt annað enn lætt fyri tann harðskapsrakta og eisini fyri fremjaran.

Tølini í dag vísa, at ein partur av teimum harðskapsraktu søkja sær hjálp og stuðul. Tó vísa kanningar, at tað er sera trupult hjá harðskapsraktum at koma hartil, at tey tora at viðurkenna sína støðu. Tað gongur long tíð, har tey halda trupulleikan fyri seg sjálv, royna at fjala støðuna og liva í vónini um, at støðan fer at broytast. Hetta hongur saman við bæði skommini og óttanum fyri, hvat ið fer at henda, um tú sigur frá. Og so óvissuni um ikki at klára seg fíggjarliga, og hvat hetta fer at merkja fyri sosiala netverkið. Her fer møguleikin fyri dulnevnt at kunna seta seg í samband við eina hjálparlinju/hotline at vera ein avgerandi hjálp. Ein samrøða við ein ráðgeva við harðskapsfakligum innliti hjálpir til at fáa sett orð á støðuna og at biðja um neyðugu hjálpina.

Fremjarar hava somuleiðis tørv á hjálp til at sleppa burtur úr harðskapinum. Við fyrru heildarætlanini varð eitt átak skipað við viðgerðartilboði til teirra, sum fremja harðskap. Endamálið var, at tey, sum fremja harðskap, skulu fáa hjálp og amboð til at steðga við harðskapinum. Ein avbjóðing við hesi skipan er tó, at hon er ongantíð vorðin kjølfest á einum staði, har tú sum fremjari bæði lætt og dulnevnt kanst venda tær. Tað er framhaldandi neyðugt at tryggja fremjarum ráðgeving og hjálp, eisini sálarfrøðiliga hjálp, har tað er neyðugt. Í okkara grannalondum síggja vit, at hetta eisini er lagt í hotline-skipanir við harðskapsráðgeving, ið taka ímóti áheitanum og skipa tilboð til fremjarar. Talan er um tilboð, ið eru skipað sum lággáttartilboð. Dømi um hetta eru eitt nú Lev Uden Vold og Dialog mod Vold, sum vísa seg at hava sera góðar royndir. Tað, at ein harðligur persónur kann fara í viðgerð, kann virka fyribyrgjandi fyri makar, børn, avvarðandi og møguligar framtíðar makar.

## Átak 17

**Hjálparlinja/hotline – dulnevnd harðskapsráðgeving við telefon, kjat, telduposti og heimasíðu, íroknað sálarfrøðiviðgerð til fremjarar**
**Endamál:** At skipa eina dulnevnda hjálparlinju/hotline-tilboð til harðskapsrakt, avvarðandi, fakfólk og fremjarar, har harðskapsfaklig starvsfólk ráðgeva, alt eftir hvørjum áheitanin kemur frá. Hetta verður skipað bæði við telefon ásetta tíð á døgninum, við kjatti og í telduposti. Somuleiðis verður skipað heimasíða við viðkomandi upplýsing og kunning fyri allar málbólkar. Er ynski um tað, verða víst víðari til serstaka ráðgeving ella viðgerðartilboð.
**Mettur kostnaður:** 300.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Hotline
**Tíðarætlan:** Hvørt ár

## Átøk at stuðla vísindaligum kanningararbeiði innan harðskapsøkið

Fakøkið harðskapur hevur seinastu áratíggjuni ment seg til eisini at fevna um vísindaligt arbeiði. Tilgongdin er skipað bæði á sentrum, har dagliga arbeiðið verður gjørt, og í einum samstarvi við universitetini. Talan er bæði um vísindaligt arbeiði við støði í einstøkum ætlanum og kanningartilfar, sum regluliga verður savnað inn.

Í Føroyum eru vit týðiliga eftirbátur á hesum øki. Hóast Kvinnuhúsið øll árini hevur savnað hagtøl fyri sítt virksemi, so er veruliga tørvur á at fáa arbeitt meira tilvitað við innsavnan av tilfari í breiðari merking. Hesin parturin er avgjørt neyðugur, skulu Føroyar frameftir arbeiða við harðskapsøkinum í eini samanberandi tilgongd við umheimin.

Henda staðfesting grundgevur samstundis fyri,

at henda heildarætlanin raðfestir tørvin á at fáa innsavnað, ment og føroyskað tilfar á føroyskum máli, ið lýsir økið, lærir okkum at síggja, skilja og handfara harðskap, ikki minst fyri at kunnu bjóða neyðugu hjálparmøguleikar fyri allar partar.

Samstundis er hetta tilfar grundarlagið fyri at fáa sett orð á og skapa eitt mál fyri harðskapsøkið, sum eisini skal brúkast innan fakútbúgvingar. Tá hetta er vorðið partur av hesum útbúgvingunum, er grundarlag lagt fyri, at harðskapur verður partur av lærutilgongd um mørk, atferð og dannilsi, bæði á stovnum, í fólkaskúla og á ungdóms- og miðnámsútbúgvingum.

Eisini verður hetta neyðugt amboð at brúka breitt innan øll tey fyrrnevndu fakøki, har skeiðvirksemi um harðskap og harðskapsdynamikkir verður skipað sum átøk. Her er endamálið at læra at brúka sama „mál", tá ið tað snýr seg um at standa saman, og um at veita hjálp og stuðul til harðskapsrakt.

Ein serlig styrki í hesi tilgongd er samstundis, at vit framtíðartryggja tilfarið til at brúka í sambandi við vísindaligar kanningar fyri Føroyar. Við hesum knýta vit okkara harðskapsfakliga øki í tað stóra vísindaliga arbeiðið, sum longu nú er savnað inn og ment í okkara grannalondum.

***

Í grannalondunum síggja vit, at virksemið innan harðskapsfakligheitina er skipað við vitanardeplum sum parti av eini organisation við bæði kreppumiðstøð, ambulantari ráðgeving og hotline. Á vitanardeplinum er tað eitt harðskapsfakligt starvsfólk, sum hevur ábyrgdina av arbeiðinum. Hesin virkisparturin hevur ábyrgdina av eitt nú at savna tilfar, bæði hagtøl og annað vitanartilfar, at skipa menningina og standa fyri upplýsing, kunning, undirvísing og samskifti. Hetta eru alt krevjandi uppgávur, sum Kvinnuhúsið undir verandi kørmum og við einum øktum arbeiðstrýsti, hevur trupult at taka ábyrgdina av.

Sjóneykan eigur altíð at vera sett á kjarnuuppgávuna, at veita hjálp, stuðul og ráðgeving til harðskapsrakt. Men hinvegin er menningin neyðug og tørvur er alla tíðina á at bøta um tænastuna, at styrkja fakligheitina og virksemið bæði í ambulantu Harðskapsráðgevingini, á Kreppumiðstøðini og í Hotline.

Ein møguleiki kundi verið at keypt seg til henda partin. Men mett verður, at hetta fyri tað fyrsta verður dýrari, og fyri tað annað at tann vitan, sum verður savnað inn, als ikki verður kjølfest í harðskapsøkið.

Um eitt fakfólk verður sett, fella uttanhýsis útreiðslur til hetta økið burtur, og uppgávurnar innan virkisøkið hjá vitanardepilinum verða verandi innan karmarnar í Kvinnuhúsinum.

## Átak 18

**Harðskapsfakligt starvsfólk í Kvinnuhúsið – at arbeiða við átøkum og menning av vísindadeildini burturav, tíðaravmarkað starv fram til 2028**
**Endamál:** At standa á odda fyri at savna tilfar, bæði hagtøl og annað vitanartilfar, at skipa menningina og standa fyri upplýsing, kunning, undirvísing og samskifti
**Mettur kostnaður:** 600.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Tíðaravmarkað starv til 2028

Við einum Vitanardepli í Kvinnuhúsinum ber til at savna, menna og føroyska tilfar innan harðskapsfakliga økið og at miðla vitanina bæði til harðskapsrakt, til gagns fyri fólk, sum ivast í, um tey eru harðskapsrakt; avvarðandi og fakfólk og til fremjarar.

Fleiri av omanfyri nevndu átøkunum: – upplýsing sum fyribyrging, at skipa fyri sjálvhjálpar- og samtalubólkum, at skipa skeið og undirvísing og byrjandi eftirvernd, at menna nýggju heimasíðuna – eru ein liður í at víðka Harðskapsráðgevingina við fyrri og betri tilboðum til harðskapsrakt, at menna Kreppumiðstøðina og at menna eina hjálparlinju/hotline.

Skjótari harðskapsrakt fáa hjálp, minni gerast skaðarnir, og størri eru sannlíkindi fyri at bróta út úr harðskapinum. Tað má alla tíðina arbeiðast við at savna og menna tilfar, sum kann bøta um góðskuna av tilboðunum.

Starvsfólkini og sjálvboðin í Kvinnuhúsinum mugu áhaldandi mennast fakliga og hava stundir at seta seg inn í nýggjastu granskingina á økinum og fylgja nýggjastu altjóða granskingarúrslitum innan hetta samansetta økið og ikki minst fyri at seta nýggj tiltøk í verk.

## Átak 19

**Vitanardepil at savna, menna og føroyska undirvísingartilfar innan harðskapsfakligheit**
**Endamál:** At styrkja arbeiðið í ambulantu ráðgevingini á Kreppumiðstøðini, og at menna hjálparlinju/hotline, at framleiða tilfar til allar starvsfólkabólkar í Kvinnuhúsinum, til sjálvbodnu vaktirnar, til samtalubólkar, til sjálvhjálparbólkarnar, til skeið og í undirvísing, til fakbólkar og markamót, og til at menna innihaldið á nýggju heimasíðuni.
**Mettur kostnaður:** 0 kr.
**Ábyrgd:** Kvinnuhúsið
**Tíðarætlan:** Hvørt ár

At gera vísindaligar kanningar í Føroyum er sera umráðandi, skulu vit kunna samanbera okkum við onnur lond.

Føroyar er eitt smásamfelag, og vit vita, at tað bæði kann hava fyrimunar og vansar við sær. Tað er væl hugsandi, at nøkur viðurskifti í Føroyum tí eru øðrvísi, og hetta eiga vit at kanna nærri.

## Materiellur harðskapur:

„vit høvdu verið úti við børnunum. Tá vit komu heim, bleiv hann brádliga rasandi. Hann hugdi rundan um seg og tók eitt av teimum tingunum, sum eg eri eyka góð við, ein dýrabaran vasa, sum eg havi arvað eftir mammu míni. Hann kastaði vasan í gólvið, so hann fór í knús. Hann visti væl, hvat vasin hevði at týða fyri meg – tað var nokk eisini tí, at hann valdi at bróta júst hendan"

Arbeitt hevur síðani oktober mánað 2022 verið við verkætlan, har harðskapøkið í Føroyum er kortlagt[35]. Talan er um eitt samstarv millum Sig Frá-verkætlanina og Søgu- og samfelagsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya, har leiðarin í Kvinnuhúsinum hevur verið partur í fylgibólkinum. Eitt av endamálunum hevur verið at koma við tilmælum til, hvørjar vísindaligar kanningar eiga at verða gjørdar fyri harðskapsøkið, og hvussu vit skulu raðfesta tær.

## Átak 20

**Vísindaligar kanningar innan harðskapsøkið**
**Endamál:** Hetta tíðarskeiðið, ið heildarætlanin er ásett, 2023-2028, verða árliga gjørdar vísindaliga kanningar innan harðskapsfakliga økið. Hesar hava til endamáls at flyta okkum fram á leið á harðskapsfakliga økinum, soleiðis at vit kunnu samanbera okkum við grannalondini. Vís verður til fylgiskjal 2
**Mettur kostnaður:** 300.000 kr.
**Ábyrgd:** Almanna- og mentamálaráðið, Kvinnuhúsið og Fróðskaparsetur Føroya
**Tíðarætlan:** Hvørt ár

35 Henda verkætlanin verður almenn í august mánað 2023

# Eftirmæli

## Er tøgnin brotin?

Heildarætlanin móti harðskapi í parlagi og øðrum nærsambondum frá 2011 hevði sum mál, at tøgnin skuldi brótast. Men tøgnin er framvegis ikki brotin.

Hoyringarnar, sum arbeiðsbólkurin hevur havt, vísa greitt, at tøgnin framvegis fjalir stórar partar av harðskapsøkinum. Serliga tá ið talan er um harðskap í parløgum og øðrum nærsambondum.

Heildarætlanin frá 2011 var tó eitt stórt frambrot, tí hon setti hol á eina tilgongd. Heildarætlanin hevur havt við sær, at vit eru meira tilvitað og tosa meira opið um harðskap í dag, enn vit gjørdu fyri 2011. Men vit eru enn á einum byrjanarstigi, og harðskapur í nærsambondum er tí framvegis nakað, sum í høvuðsheitum fer fram innan fyri teir fýra veggirnar í heiminum.

Arbeiðsbólkurin vónar, at henda heildarætlanin – og tey átøkini, hon mælir til at seta í verk – kann seta enn meira ferð á almenna kjakið, og at vit kunnu halda fram við at menna eitt mál fyri harðskapin. At vit fáa harðskapin fram í ljósmála, og á tann hátt flyta okkum longri fram á leið. Tá fólk eru tilvitað um, at tað, ið tey hava verið fyri, er skeivt, minka sannlíkindini fyri, at tey venda sjóneykuni inneftir og onkursvegna geva sær sjálvum skyldina. Hetta kann møguliga gera tað lættari at leita sær hjálp.

Avgerandi er tó, at arbeiðið ikki steðgar, tá ið heildarætlanin er latin úr hondum. Vit mugu alsamt eftirmeta tey átøkini, sum fara at verða sett í verk komandi árini, og tillaga tey, har tað vísir seg at vera neyðugt. Ein treyt fyri hesum er, at vit fáa munandi størri vitan um harðskapsøkið, enn vit hava í dag. Tað hevur tí alstóran týdning, at granskingar- og vitanarparturin ikki liggur eftir, tá ið átøkini, sum heildarætlanin mælir til, skulu førast út í lívið komandi 5 árini.



# Fylgiskjal 1

## 32 partar til hoyringar

**nýggja heildarætlanin um harðskap í parløgum og nærsambondum 2023-2028**

| Virkisøkið | Aktørur |
|---|---|
| **Harðskapsfakliga** | Kvinnuhúsið |
| **Sosialfakliga** | Megna títt lív |
| | Barnabati |
| | MEGD |
| | Sosialráðgevarafelagið |
| **Kommunalt** | Kommunufelagið |
| | SSP |
| | Barnaverndarstovan |
| **Útbúgvingarliga** | Læraraútbúgvingin (Setrið) |
| | Námsfrøðiútbúgvingin (Setrið) |
| | Sjúkrarøktarfrøði (Setrið) |
| | Heilsurøktaraútbúgvingar (Heilsuskúlin) |
| | Heilsuhjálparaútbúgvingar (Heilsuskúlin) |
| | Námsfrøðihjálparaútbúgvingin (Heilsuskúlin) |
| **Heilsufaklig feløg og virksemi** | Heilsurøktarafelagið |
| | Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar |
| | Heilsuhjálparafelagið |
| | Kommunulæknar/Læknavakt |
| | Gigni |
| | Ljósmøðrafelag Føroya |
| | Felagið Føroyskir Sálarfrøðiingar |
| **Skúla- og dagstovnafaklig feløg** | Føroya Lærarafelag |
| | Føroya Pedagogfelag |
| | Hjálparfólkafelagið |
| **Almennir stovnar og myndugleikar** | Útlendingastovan |
| | Nám |
| | Kriminalforsorgin |
| | Føroya Politi |
| | Javnstøðunevndin |
| **Felagsskapir** | Amnesty |
| | Brotsfrøðifelag Føroya |
| | KRIS |

# Fylgiskjal 2

**Tilmæli til Almanna- og mentamálaráðið: At menna vitan og gransking um harðskapsøkið í Føroyum**

Tilmælini, sum verða løgd fram og raðfest í hesum teksti, hava yvirskipað til endamáls at menna granskingargrundaða vitan um harðskapsøkið í Føroyum.

## Tilmæli 1: At miðsavna vísindalig vitanarátøk á harðskapsøkinum

Mælt verður til, at vísindaliga arbeiðið á harðskapsøkinum verður miðsavnað undir einum samstarvi millum Setrið, Kvinnuhúsið, Almanna- og mentamálaráðið og aðrar viðkomandi stovnar.

Hetta vitanarsamstarvið skal tryggja, at granskingargrundað vitan um harðskap í Føroyum verður staðsett undir einum skipaðum átaki, ið hevur fokus á og raðfestir at fáa hesa vitan til vega.

Mælt verður til, at hetta tvørfakliga samstarvið skal umsita vísindaligar verkætlanir, ið skula menna granskingargrundaða vitan um harðskapsøkið í Føroyum.

Vitanin á harðskapsøkinum er avmarkað, og tí verður mælt til, at vísindaligu verkætlanirnar, ið kunnu veita átrokandi og neyðuga vitan til tess at menna harðskapsfakliga økið í Føroyum, verða framdar fyrst.

## Tilmæli 2: At eyðmerkja og skipa verandi vitan á harðskapsøkinum

Mælt verður til at eyðmerkja og skipa verandi vitan á harðskapsøkinum. Hetta skal gerast við tí fyri eyga, at vísindaliga arbeiðið, ið framyvir skal setast í verk á økinum, kann byggja víðari á ta vitan um harðskap, sum ymiskir aktørar og fakfólk á økinum longu hava um hendi.

Hetta er ein verkætlan, sum í fyrstu atløgu krevur, at eyðmerkt verður, hvørjir aktørar og fakfólk hava viðkomandi vitan um hendi. Hereftir skal verkætlanin leggja eina ætlan fyri, hvussu vitan og royndir á økinum kunnu skrásetast og skipast eftir einum vísindaligum leisti.

Nágreiniliga verður mælt til, at eitt fyrsta stig er at skráseta og skipa verandi vitan. Hetta er tann stóra mongdin av tilfari, sum Kvinnuhúsið gjøgnum fleiri ár hevur savnað inn og skrásett. Ein leistur skal gerast, ið tryggjar, at tilfarið kann verða brúkt í tí vísindaliga arbeiðinum, sum framyvir skal gerast á økinum.

Hetta skal vera ein innleiðandi vísindalig verkætlan, sum skal framtíðartryggja, at ein størri mongd av tilfari kann brúkast í tí vísindaliga arbeiðinum, sum framyvir skal setast í verk á økinum.

## Tilmæli 3. Harðskapsupplivingar hjá harðskapsraktum í einum smásamfelag

Mett verður, at tað er umráðandi at fáa til vega vitan um, hvussu persónar, ið eru ella hava verið úti fyri harðskapi, navigera harðskapsuppliving sína í einum smásamfelagi sum Føroyar.

Fleiri sterkar ábendingar eru um, at tað eru serlig viðurskifti, ið eyðkenna Føroyar, sum hava stóra og viðkomandi ávirkan á, hvussu tað kennist at vera harðskapsraktur í Føroyum.

Tað er í sjálvum sær umráðandi at vita meir um upplivingina og navigeringina hjá harðskapsraktum. Hetta kann vísa á, hvørjum avbjóðingum harðskapsrakt serliga møta, og hvørjir tørvir eru á økinum.

Harumframt kann tílík vitan geva innleiðandi ábendingar um, hvørji onnur viðurskifti eru viðkomandi at skilja betur og at kanna nærri í einum føroyskum harðskaps- og smátjóðakonteksti.

**Viðkomandi spurningar:** Hvørja ávirkan hava tøttu sambondini í samfelagnum? Hvørji serlig atlit taka harðskapsrakt? Verður harðskapurin fjaldur? Hvussu verður harðskapurin umrøddur? Hvør veit um harðskapin? Hvussu leita harðskapsrakt sær hjálp út úr harðskapinum? Hvussu eru netverk teirra? Hvønn stuðul veitir netverkið? Hvussu er við anonymiteti? Hvat 'vita' fólkini rundanum? 'Blanda' fólk seg?

*Eitt stuðlandi tilmæli undir hesum er, at við íblástri frá háttalagi innan luttakandi aktiónsgransking verður mælt til, at sjónarmið teirra, ið uppliva harðskap, saman við hollu praksisgrundaðu vitanini hjá Kvinnuhúsinum, skal leggja støði undir og hava ein sentralan leiklut í tí vísindaliga arbeiðinum, sum framyvir verður gjørt á økinum.*

## Tilmæli 4. Serliga útsettir bólkar á harðskapsøkinum í Føroyum

Mett verður, at tað er serliga umráðandi at raðfesta vitan um, hvørjir bólkar av fólki eru serliga útsettir, tá tað kemur til harðskap. Útsettir bólkar eru ofta ikki so sjónligir í samfelagnum, og er tað tískil ein avbjóðandi uppgáva at fáa atgongd til hesa vitan.

Altjóða gransking vísir yvirskipað á, at ymiskir minnilutar eru lutfalsliga meiri útsettir fyri at verða úti fyri harðskapi. Neyðugt er at kanna nærri, hvussu hetta sær út í Føroyum, og hvørjir bólkarnir eru, ið vit ofta ikki varnast á føroyska harðskapsøkinum.

Hetta kanningararbeiði kundi verið skipað við støði í eini intersektionellari tilgongd, ið eisini leggur upp fyri eini normkritiskari fatan av, hvussu harðskapur í nærsambondum verður skilmarkaður.

Í hesum sambandi má verða lagt upp fyri, hvør hevur eina minni og meira sterka rødd í samfelagnum, og hvat hetta ger fyri líkindi at finna fram til ávísir persónar.

**Viðkomandi spurningar í hesum sambandi:** Eru ávísir bólkar serliga útsettir? Eru felags eyðkenni fyri rakta ella fremjara? Hvussu verður eitt nærsamband fatað? Kunnu ávís viðurskifti gera, at nærsambond síggja øðrvísi út? Hvør er valdandi ímyndin av harðskapsraktum persónum? Hvør er valdandi ímyndin av harðskapsfremjarum?

## Tilmæli 5: Tøgn sum fyribrigdi, ið valdar á harðskapsøkinum

Mett verður, at tað er týdningarmikið at skilja betur ta tøgnina, sum valdar á harðskapsøkinum í Føroyum. Tøgnin ger seg galdandi á fleiri ymiskar hættir og í ymiskum samanhangum, og tískil kann ein tílík verkætlan verða skipað frá fleiri ymiskum vinklum.

Ein tílík verkætlan kann siga nakað um, hvørji serlig atlit skulu takast, tá átøk verða gjørd, ið miða eftir at bróta tøgnina á harðskapsøkinum. Millum annað kann hetta vera ein verkætlan, ið er eitt týðandi íkast til arbeiðið hjá Sig-frá-átakinum, ið ynskir at bróta valdandi tøgnina á harðskapsøkinum.

Væntað verður, at tær viðmældu verkætlanirnar omanfyri, eins og henda frágreiðingin, vísa á, at tøgn er eitt sera komplekst og viðkomandi evni á harðskapsøkinum sum heild, sum eisini er stórliga ávirkað av samfelagsliga kontekstinum, so sum at vera eitt lítið samfelag.

**Viðkomandi spurningar**: Hvat liggur aftan fyri tøgnina? Hvussu uppliva harðskapsrakt tøgnina? Hvat kann tøgnin siga um valdandi normar, virðir og fatanir í samfelagnum? Hvat hendir, tá tøgnin verður brotin? Hvat er upp á spæl við at bróta tøgnina? Er tøgnin hierarkisk? Er tøgnin sterkari ella øðrvísi í einum lítlum samfelag?

# Fylgiskjal 3

Í heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028 og í heildarætlanini fyri sálarliga heilsu í Føroyum 2018 verður mælt til átøk, sum eisini kundu bøtt um viðurskifti, ið hoyringarpartar til harðskapsheildarætlanina hava víst á. Tilsamans er talan um 25 ymisk átøk úr øðrum heildarætlanum, sum arbeiðsbólkurin mælir til at seta í verk. Í brotunum niðanfyri verður greitt nærri frá, hvørji átøk úr øðrum heildarætlanunum, ið arbeiðsbólkurin mælir til 1) at seta í verk beinleiðis ella við tillagingum, og 2) hvørji átøk kunnu brúkast sum íblástur.

## 1) Átøk at seta í verk beinleiðis ella við tillagingum

*Tilmæli 1 úr Rúsevnisheildarætlan – endurskoða barnaverndarøkið*

Undir okkara hoyringarfundum hevur verið gjørt vart við, at yrkisfólk og stovnar aftra seg við at boða frá til Barnaverndina, tí tey ikki meta seg fara at fáa nøktandi hjálp, vegleiðing og stuðul. Fleiri nevndu í hesum sambandi eisini møguleikan fyri, at tað umframt barnaverndartænastuna átti at verið ein annar instansur, hvørs einasta uppgáva var at hjálpa, ráðgeva og vegleiða foreldrunum og fakfólki, men sum ikki hevur heimild at taka børnini frá foreldrunum. Vit taka tí undir við tilmæli 1 úr *Rúsevnisheildarætlanini um, at barnaverndarøkið eigur at verða endurskoðað.*

*Tilmæli 2 úr Rúsevnisheildarætlan – endurskoða Sernám*

Leikluturin hjá Sernámi er sambært § 4 í fólkaskúlalógini: *„at veita skúlum, foreldrum og øðrum, ið varða av neminginum í fólkaskúlanum, sernámsfrøðiliga og sálarfrøðiliga ráðgeving“*. Sernám er tí skil í høvuðsheitum ein ráðgevandi stovnur, ið hjálpir børnunum umvegis tey fakligu starvsfólkini, sum eru um barnið í gerandisdegnum í skúlum og dagstovnum. Sernám hevur í dag trupult við at nøkta tørvin og eftirspurningin eftir hjálp, og tí mugu børn ofta bíða ov leingi eftir tí hjálp, sum tey hava tørv á.

Við øðrum orðum er talið á uppgávum og málum størri, enn verandi starvsfólkaorka megnar at loysa. Við støði í hesum og í útsøgnum frá hoyringunum, tekur arbeiðsbólkurin undir við tilmælinum um at endurskoða Sernám, tí børn, foreldur og starvsfólk, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru rakt av harðskapi, mugu fáa nøktandi hjálp og stuðul frá Sernámi.

*Tilmæli 3 úr Rúsevnisheildarætlan og tilmæli 13 úr Heildarætlan fyri sálarliga heilsu – heilsufrøðiligar tænastur til øll børn*

Heilsufrøðingar koma í so at siga øll heim við børnum í Føroyum og eru tí lyklapersónar, sum hava eitt serstakt samband við børn og familju. Undir verandi skipan er ein rættiliga drúgvur steðgur millum vitjanirnar, frá tí at børnini eru 18 mánaðir, og til tey fara í skúla. Tilmælini 3 og 13 mæla til, at Gigni skal varðveita sítt tilknýti til børnini og teirra avvarðandi øll árini frá føðing, til barnið er 18 ár. Fyri harðskapsrakt børn er tað umráðandi, at tey fáa eitt trygt tilknýti til heilsufrøðingin, soleiðis at tey kenna seg trygg at siga frá, um barnið ella familjan eru rakt av harðskapi. Eisini fær Gigni betri høvi at ráðgeva familjuni og at varnast, um harðskapur fer fram í familjuni. Tí verður tikið undir við hesum tilmæli.

*Tilmæli 4 úr Rúsevnisheildarætlan – endurskoða SSP*

SSP er eitt tvørfakligt samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politiið, ið arbeiðir fyri og við børnum og ungum. Upprunaliga var virkisøkið kriminalitetsfyribyrgjandi, men síðan stovnanina í 2008 hevur virkisøkið flutt seg til eisini at fevna um trivnað, tryggleika á netinum, ferðslu, foreldranetverk, kynsligan ágang, talgilt samskifti o.s.fr. Í virkisætlanini hjá SSP fyri 2022-2023 er einki nevnt um harðskap, hvørki í mun til upplýsing, fyribyrging ella eyðmerking av, nær talan er um harðskap. Undir hoyringunum er komið fram, at tøgnin als ikki er brotin, tá tað snýr seg um harðskap, og at harðskapur í familjum og nærsambondum framvegis er nakað,



sum vit tora illa at seta orð á. Í hesum sambandi kundi SSP verið viðvirkandi til at upplýsa, greina og birta uppundir kjak um harðskap í nærsambondum. Sum arbeiðsbólkur taka vit undir við tilmælinum um at endurskoða SSP, har ein av nýggju uppgávunum hjá SSP kundi verið at verið við til at brotið tøgnina innan harðskapsøkið í nærsambondum.

*Tilmæli 7 úr Rúsevnisheildarætlan – Menna trivnaðararbeiðið í fólkaskúlanum*

Vit taka undir við tilmælinum um at menna trivnaðararbeiðið í fólkaskúlanum, tí tey níggju árini í fólkaskúlanum er tann einasta tíðin í lívinum, har vit frá samfelagsins síðu hava undirvísingarskyldu, og har børnini onkursvegna hava møguleika at verða sædd og hoyrd. Við at leggja størru orku, tíð og kreftir í trivnaðararbeiði, verður møguleikin størri at varnast og leggja uppí, tá lagt verður merki til, at eitt barn mistrívist. Trivnaðararbeiðið kann styrkjast við at hækka játtanina til førleikastovurnar, soleiðis at starvsfólkini í førleikastovunum fáa meira tíð til at gera sítt arbeiði, umframt at raðfesta skipaða førleikamenning til starvsfólkini.

*Tilmæli 8 úr Rúsevnisheildarætlan – Menna flokslæraraarbeiðið í fólkaskúlanum*

Flokslærarin hevur sera stóran týdning fyri trivnaðin hjá børnunum í skúlanum. Flokslærarin hevur m.a. til uppgávu at taka hond um trivnaðin og at boða foreldrum frá mistrivnaði ella trupulleikum í skúlanum. Er eitt barn í flokkinum, sum upplivir harðskap heima við hús, so er flokslærarin ofta tann vaksni persónurin, sum barnið hevur mest tíð saman við. Tað er tí avgerandi, at flokslærarin hevur nóg mikið av tíð og nøktandi umstøður annars til at kunna varnast trupulleikan og til at kunna møta barninum. Vit taka tí undir við tilmælinum um at menna flokslæraraarbeiðið í fólkaskúlanum. Hetta kann ítøkiliga gerast við at hækka tímajáttanina til flokslæraraarbeiði. Í álitinum, ið júst er handað landsstýrismanninum í skúlamálum, verður mælt til at økja játtanina soleiðis, at flokslærarin hevur fleiri tímar til hvønn næming. Harumframt er tað umráðandi, at flokslærarin fær eftirútbúgving til at kunna røkja flokslæraraarbeiðið, eins og tað er týdningarmikið, at flokslærarin hevur nøktandi vitan og førleikar til at kunna handfara støður við harðskapi.

*Tilmæli 15 úr Rúsevnisheildarætlanini – Skipan, har til ber at varnast mistrivnað fyrr*

Børn, sum liva í harðskapsraktum heimum og nærsambondum, eru sjálvsagt merkt av harðskapinum. Hóast hetta varnast tey vaksnu, sum barnið hevur rundanum seg, ikki altíð nóg tíðliga ta álvarsligu støðuna hjá barninum. Vit taka undir við tilmælinum um at skipa tilgongd til at varnast mistrivnað, tí skjótari tað verður lagt merki til, at eitt barn mistrívist, lættari er tað at fyribyrgja ella leggja uppí. Í hesum sambandi er tað týdningarmikið við tvørgeiraligum samstarvi, og at tað verður samskift tvørtur um fakmørk. Eitt amboð og háttalag, ið nakrir dagstovnar og skúlar í Føroyum longu nýta til at varnast mistrivnað, er TÍTT (tiltøk í tøkum tíma), har dentur m.a. verður lagdur á felags undran, og har tað m.a. við samrøðufrymli og trivnaðarskjali verður miðað eftir at økja tilvitanina og náa eina felags refleksjón. Samanumtikið tekur hesin arbeiðsbólkur undir við tilmælinum um at menna skipan, amboð og arbeiðshættir, sum gera tað møguligt at varnast mistrivnað so tíðliga sum yvirhøvur gjørligt.

*Tilmæli 16 úr Rúsevnisheildarætlanini – samrøðu- og samskiftisamboð.*

Í tráð við tilmæli 15 omanfyri er endamálið her at undirvísa ymsar fakbólkar í samrøðu- og samskiftisamboðum. Endamálið er at veita øllum, sum arbeiða við ella rundanum okkara børn, innlit, vitan og førleika at samrøða undrandi og grundandi um trupul evni sínámillum og við foreldur, avvarðandi og børn, soleiðis at trupul mál, so sum harðskapur, kunnu koma fram í ljósmála.

*Tilmæli 17 úr Rúsevnisheildarætlanini – verkstovur/ ráðstevnur*
Tilmælið snýr seg um, at misskiljingar og ógreidleikar í samskiftinum millum fakbólkar møguliga kunnu beinast av vegnum við ráðstevnum og verkstovum um ymisk viðkomandi evni. Vit mæla í hesum sambandi til, at harðskapur verður tikið upp sum evni á slíkum verkstovum/ráðstevnum. Verkstovurnar kunnu sostatt vera við til at fremja samstarv um harðskapsøkið, tryggja at fakbólkar skilja hvønn annan, nýta sama fakmál um harðskap og kenna virkisøki hvør hjá øðrum. Her verður eisini víst til átak 15 í hesi heildarætlan, ið snýr seg um at skipa fyri verkstovum fyri yrkisbólkum, ið hava markamót til harðskapsøkið.

*Tilmælir 22, 23, 24 og 25 úr Rúsevnisheildarætlanini – neyðtelefonir hjá Barnabata og øðrum*
Tilmælið 22 snýr seg um, at *Tú & Eg Ráðgevingin* hjá Barnabata skal vera tøk alt samdøgrið. Tú & Eg Ráðgevingin er eitt ókeypis lággáttartilboð, sum er ætlað børnum og ungum (serliga yvir 13 ár), har tað ber til at vera anonymur, tá ið tú ringir ella setur spurningar í online-kjattinum. Tað verður tikið undir við, at ráðgevingin verður tøk alt samdøgrið, soleiðis at børn og ung, ið liva í harðskapsraktum heimum, altíð kunnu venda sær til ráðgevingina við sínum trupulleikum. Harðskapsøkið kann hugsast inn í tilmælið á tann hátt, at ráðgevar í Barnabata fáa skeið innan harðskapsfakið, soleiðis at ráðgevar eru ílatnir til at vísa børnum og ungum til aðra hjálp og til at skilja barnið í tí støðuni, tað er í.

Tilmæli 23 er eitt tilmæli um „HeadSpace", ið er eitt annað slag av hjálparlinju og eitt tilboð, har børn og ung kunnu koma á gátt at práta um alskyns avbjóðingar. Hetta kann eisini gagna harðskapsraktum børnum og ungum, tí tilboðið snýr seg um trivnað hjá barninum sum heild.

Í Tilmæli 24 verður víst á, at einki stað er hjá foreldrum at venda sær at spyrja um ráðgeving ella spyrja um egnan foreldraførleika. Tí verður mælt til, at ein foreldraráðgeving verður skipað. Arbeiðsbólkurin tekur undir við, at foreldraráðgeving skal setast í verk, og heldur, at tilboðið eisini eigur at fevna um avvarðandi og onnur vaksin í nærsambondum hjá børnunum. Arbeiðsbólkurin mælir harumframt til, at ráðgevar í foreldraráðgevingini fáa skeið í harðskapsfakinum, soleiðis at ráðgevararnir eru førir fyri at veita harðskapsfakliga ráðgeving.

Tilmæli 25 snýr seg um at skipa fyri eini telefonráðgeving í vanligari arbeiðstíð til fakfólk, ið hava tørv á at leita sær ráð í sambandi við ítøkiligar støður. Tað verður tikið undir við hesum tilmælinum, sum hevði gjørt tað møguligt hjá fakfólkum at sparra við eina ráðgeving um mistrivnað hjá einum barni, sum møguliga kann vera íkomin av harðskapi í familjuni.

Tilmælini 24 og 25 knýta seg til átak 17 í hesi harðskapsheildarætlan um at seta í verk eina ráðgevandi hotline, ið fólk dulnevnt kunnu venda sær til við spurningum um harðskap. Tað er hugsandi, at eitt samstarv kann fáast í lag millum ráðgevingarnar.

*Tilmælir 34 og 35 úr Rúsevnisheildarætlanini – foreldraleiklutur og familjuhús:*
Nøkur foreldur hava tørv á hjálp og stuðli, um tey skulu megna at vera røttu fyrimyndirnar fyri síni børn. Tilmæli 34 snýr seg um at kanna møguleikarnar fyri at skipa eitt slag av „familjuhúsi", har fleiri myndugleikar, skipanir og tilboð eru umboðað, og har barn og familja eru í miðdepilinum. Tað kann virka fyribyrgjandi, at familjan fær hjálp og vegleiðing í einum familjuhúsi. Arbeiðsbólkurin skjýtur eisini upp at kanna, um Kvinnuhúsið møguliga kundi verið knýtt at familjuhúsinum, um familjan er ella hevur verið rakt av harðskapi.

Tað verður í tilmæli 35 mælt til at kanna, hvussu familjudepilin riggar, og um tilboðið kann víðkast. Mælt verður til at kanna møguleikarnar fyri at skipa tilboð sum mentorskipan, praktiska hjálp og ráðgeving í heiminum. Familjudepilin er eitt amboð hjá barnaverndum, sum er nýtt til at hjálpa familjum til m.a. at styrkja og menna foreldraførleikan. Nógv av teimum, sum ikki hava nøktandi foreldraførleika, koma sjálv úr familjum við avbjóðingum og hava tí ikki havt góðar fyrimyndir fyri, hvussu tað er at vera foreldur. Eisini viðvíkjandi harðskapi kann tað vera fyribyrgjandi, at foreldur fáa styrkt foreldraførleikarnar, og at foreldur, ið sjálv koma úr familjum við avbjóðingum, kunnu fáa vegleiðing til, hvussu tey kunnu handfara ymsar støður, soleiðis at tey ikki nýta eitt nú harðskap, tá ið truplar støður taka seg upp.

*Tilmæli 44 úr Rúsevnisheildarætlanini – tagnarskylda*
Bæði Heildarætlanin fyri harðskap í parlagi og nærsambondum frá 2011 og Rúsevnisheildarætlanin mæla til at gera eina vegleiðing til yrkisfólk um tagnarskylduna. Víst verður á, at yrkisbólkar síggja lógarásettu tagnarskylduna sum eina forðing fyri samstarvi og samskipan tvørtur um myndugleikar. Hetta var eisini eitt afturvendandi evni á hoyringarfundunum hjá hesum arbeiðsbólkinum. Yrkisfólk siga seg nevniliga ivast í, um ella nær tey kunnu lata upplýsingar víðari til aðrar yrkisbólkar og myndugleikar. Tí verður tikið undir við, at ein vegleiðing um tagnarskylduna verður gjørd. Átak 15 í hesi heildarætlan er eisini ætlað til at bøta um ivamál viðvíkjandi tagnarskylduni.

*Tilmæli 14 úr Heildarætlan fyri sálarliga heilsu – Lætt atkomuliga familjuráðgeving til foreldur.*
Tilmælið snýr seg um at styrkja stuðulin til foreldur fyri at økja um møguleikarnar fyri, at børnini fáa góða umsorgan. Víst verður á, at hetta kann fyribyrgja trupulleikar, sum vanliga bara gerast størri við tíðini. Gáttin til tilboðið eigur at vera lág og atkomulig hjá foreldrum at venda sær til. Tað verður tikið undir við hesum tilmælinum, ið eisini hongur saman við tilmæli 34 og 35 úr Rúsevnisheildarætlanini.

*Tilmæli 15 úr Heildarætlanini fyri sálarliga heilsu – Námsfrøðilig ráðgeving tøk hjá øllum dagstovnum kring landið.*
Í dag eru tað einstakar kommunur, ið veita dagstovnum námsfrøðiliga ráðgeving. Dagstovnar í hesum kommunum kunnu spyrja um ráðgeving um eitt einstakt barn, ein barnabólk ella um fakliga innihaldið yvirhøvur á stovninum. Í praksis merkir hetta, at børn ikki fáa javnbjóðis tænastur, tí bert í ávísum stórum kommunum kunnu børn og dagstovnar fáa hjálp, stuðul og ráðgeving frá kommunalari námsfrøðiligari ráðgeving. Eitt boð upp á loysn kundi verið, at ein námsfrøðilig ráðgeving varð skipað í hvørjum av teimum átta kommunalu samstarvseindunum, sum longu í dag hava skipað samstarv innan eitt nú barnaverndarøkið. So kundu allir dagstovnar kring landið fyrst vent sær til sína egnu námsfrøðiligu ráðgeving ella í samráð við námsfrøðiligu ráðgevingina vent sær til Sernám um hjálp. Hetta hevði samstundis gjørt arbeiðið hjá Sernámi greiðari.

*Tilmælir 56, 57 og 58 úr Rúsevnisheildarætlanini – vitanargrundarlag, gransking og menning av dátugrunni*
Tilmæli 56 vísir á, at tørvur er á einum einum betri vitanargrundarlagi. Mælt verður til, at uppgávurnar viðvíkjandi hagtølum, skráseting og kanningum verða lagdar til Fólkaheilsustýrið. Á harðskapsøkinum verður í dag so at siga øll skráseting framd í Kvinnuhúsinum. Talan er her um grundleggjandi skráseting, sum bæði er neyðug og átrokandi fyri at kunna menna vitanina innan harðskapsøkið. Neyðugt er við einum átaki, sum støðugt góðskutryggjar tølini, soleiðis at tey kunna nýtast í granskingarhøpi. Hetta hongur neyvt saman við átøkum 18, 19 og 20 í hesari heildarætlanini, ið snúgva seg um at menna arbeiðið við hagtølum í Kvinnuhúsinum og at seta vísindaligar kanningar í gongd. Aftrat hesum er tørvur á skipaðum landsfevnandi hagtølum, sum eitt nú kundu verið partur av skipaðu innasavningarkanningini, sum Fólkaheilsustýrið stendur fyri 4. hvørt ár. Tílíkar kanningar kunnu tryggja reglulig hagtøl fyri harðskapsøkið, ið t.d. kunnu nýtast til at samanbera við støðuna uttanlands.

Tilmæli 57 snýr seg um at fremja eina granskingarverkætlan, ið kannar feilir í viðgerðini av málum, har fleiri myndugleikar umframt barnavernd hava havt ein leiklut. Tílík granskingarverkætlan kann eisini hava eina fyribyrgjandi ávirkan innan harðskapsøkið, tí ofta eru børn partar av harðskapsmálum. Samstundis vita vit frá kanningum, at tað at vaksa upp við harðskapi ávirkar børn. Verða tey ikki hjálpt í støðuni, er vandi fyri, at hetta fer at merkja tey og fylgja teimum restina av lívinum. Tí er hetta átakið eisini neyðugt á harðskapsøkinum.

Tilmæli 58 er um menning og viðlíkahald av dátugrunni. Dátugrunnurin skal fevna um sosial hagtøl, sum kunnu nýtast til vísindaliga gransking av trivnaði, umstøðum og menning hjá føroyskum børnum og ungum. Grunnurin skal tryggja, at vitanin um hesi viðurskifti gerst atkomulig, so møguligt er at granska í teimum. Sum nevnt undir tilmæli 57 eru børn ofta partar av harðskapsmálum. Eitt vitanargrundarlag sum hetta hevði tí verið ein grundleggjandi stuðul fyri økið.

## 2) Átøk at fáa íblástur frá

*Tilmælir 47, 48 og 49 úr Rúsevnisheildarætlanini – Ávegishús, mentorskipan og bústaðartilboð*

Tilmæli 47 snýr seg um at skipa eitt ávegishús (half-way house) í einum samstarvi millum viðgerðarstovnarnar. Endamálið við ávegishúsinum er at gera vegin út í samfelagið lættari fyri persónar, sum hava verið í rúsviðgerð, og at minka um vandan fyri, at tey aftur verða bundin av rúsevnum. Fyri harðskapsrakt er ein líknandi tørvur á at gera vegin út í samfelagið lættari, soleiðis at tey ikki møta harðskapinum aftur. Eitt uppihald á kreppumiðstøð kann vara 1-3 mánaðir, og tann harðskapsrakti hevur ikki altíð ein bústað at flyta til aftaná. Tí er neyðugt við einum tilboði um bústað til harðskapsrakt og børnini hjá teimum. Tilboðið kundi verið skipað millum Kvinnuhúsið og Almannaverkið.

Tilmæli 48 er um eina mentorskipan, sum hevur til endamáls at stuðla teimum, sum eru komin úr rúsmisnýtslu at skapa sær nýggj sambond, ið kunnu stuðla undir eitt rúsfrítt lív. Harðskapsrakt, sum hava fingið hjálp annaðhvørt ambulant ella á kreppumiðstøð, hava í stóran mun tørv á at verða stuðlað í áhaldandi at kunna megna lívið uttan harðskap. Talan er um eftirvernd, og royndir við tílíkum tilboðum eru væl kend uttanlands. Kvinnuhúsið ynskir at fáa hetta sum part av sínum tilboði til harðskapsrakt, og hetta átakið er við sum átak 8 í hesi heildarætlanini. Tilboðið verður skipað av Kvinnuhúsinum og Almanna- og mentamálaráðnum.

Tilmæli 49 er um bústaðartilboð til persónar, sum hava verið í rúsevnisviðgerð. Endamálið er at skapa tryggar karmar og á tann hátt minka um vandan fyri, at persónurin aftur endar í rúsevnismisnýtslu. Sum nevnt undir tilmæli 47 eru tað ikki øll harðskapsrakt, sum megna at finna sær egnan bústað, tá tey eru klár til at flyta seg út í vanliga gerandisdagin aftur. Royndir uttanlands vísa, at tað í framhaldi av ávegishúsi er neyðugt við tilboði um bústað í eitt avmarkað tíðarskeið til teirra, sum ikki hava funnið sær egnan bústað aftan á uppihaldið. Her kann tann harðskapsrakti búgva, til viðkomandi hevur fingið egnan fastan bústað. Tilboðið kundi verið skipað av Kvinnuhúsinum, Almanna- og mentamálaráðnum, Almannaverkinum og Bústøðum.



FØROYA LANDSSTÝRI